August 2007

# Menning av veiðumøguleikum uttan fyri føroyskt sjóøki




## Fjarfiskiflotanevndin

FISKIMÁLARÁÐIÐ

## 1. Nevndararbeiðið

Í samgonguskjalinum frá 31. januar 2004 stendur soleiðis:

*"Nevnd, umboðandi vinnuna og myndugleikarnar, verður sett at gera eina menningarætlan fyri veiðumøguleikar uttan fyri føroyskt sjóøki."*

Nevndin, ið landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur sett, er:

Andras Kristiansen, Fiskivinnustovan, formaður
Ulla Svarrer Wang, Fiskivinnustovan
Kate Sanderson, Fiskivinnustovan
Jens Helgi Toftum, Fiskivinnustovan
Bjarti Thomsen, Fiskirannsóknarstovan
Rúna F. Guttesen, Løgdeildin
Jóhan Simonsen, Fiskiveiðieftirlitið
Hans Jacob Kollslíð, ráðgevi
Jákup Sólstein, Føroya Reiðarafelag
Skrivari hjá bólkinum er Hans Jákup Mikkelsen, ráðgevi

Landsstýrismaðurin hevur veitt nevndini fylgjandi arbeiðssetning:

*"Ásannandi at veiðimøguleikarnir í egnum sjógvi eru avmarkaðir og nógv troyttir, verður mett, at størstu vakstrarmøguleikarnir, tá um veiðimøguleikar ræður, eru á fjarleiðum. Undir hesum fyritreytum skal nevndin lýsa:*

1. *Møguleikar at menna veiðimøguleikarnar á fjarleiðum, har føroyingar veiða í dag.*
2. *Møguleikar at vinna veiðirættindi og –møguleikar á øðrum fjarleiðum, har føroyingar ikki veiða í dag.*
3. *Ítøkilig stig, ið skulu takast frá myndugleikans síðu, fyri at menna teir møguleikar, ið eru á fjarleiðum."*

Føroyar hava møguleikar í sínámillum-, strandalanda- og millumlandaavtalum. Altjóða sjógvur er, har Føroyar í dag ikki fiska. Eisini er hópur av strandarlondum í heiminum, sum møguliga hava ríkar møguleikar á sínum heimasjógvi.

Nevndin hevur út frá arbeiðssetninginum ásett, hvør uppgávan er. Hon kann býtast í trý, sum víst niðanfyri. Uppgávan er:

(i) at eyðmerkja, hvørjir nýggir møguleikar eru í verandi avtalum, sum Føroyar hava uttanfyri føroyskt sjóøki.

(ii) at eyðmerkja regionalar felagsskapir í heiminum og ávísa, hvussu Føroyar kunnu gerast limur og fáa atgongd til veiðumøguleikar.

(iii) at eyðmerkja áhugaverd veiðuøki innan fyri 200 fjórðingar hjá øðrum strandarlondum.

## 1.1 Arbeiðsháttur

Arbeiðshátturin í nevndini hevur verið, at fundir javnan hava verið, har limir hava lagt fram kenda og nýggja vitan, sum teir hava fingið til vega. Nevndin hevur skipað og fest hetta tilfarið á blað í hesari frágreiðing.

Partur av nevndini hevur verið í samband við vinnuna, har fleiri samrøður hava verið við persónar, sum hava royndir og vitan um økir uttan fyri føroyskt sjóøki. Samrøður hava verið við:

Thor P/F, Hósvík.
JFK Trol P/F, Klaksvík,
Christian í Grótinum P/F, Klaksvík.
Framherji SP/F, Toftir,
Ísbjørnin SP/F, Tórshavn.
Havborg P/F, Leirvík,

Hesi feløg hava givið íblástur til, hvussu farast skal fram á fremmandum leiðum.

Bygnaðurin av frágreiðingini er gjørdur beinleiðis eftir arbeiðssetninginum. Frágreiðingin er samanskrivað í ein samandrátt við tilmælum soleiðis, at hon ikki verður ov drúgv at lesa. Eftir tað er ein meira nágreinilig frágreiðing um kendar og nýggjar veiðumøguleikar.

Frágreiðingin viðger ikki, hvussu býtið millum ymsu partarnar av flotanum eru. Fiskiskapur eftir tunfiski og hvalaveiðu verður heldur ikki viðgjørdur.

# Innihald


**1. NEVNDARARBEIÐIÐ ....... 1**

1.1 ARBEIÐSHÁTTUR ....... 2

**2. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI ....... 5**

2.1 VERANDI LEIÐIR ....... 6

2.2 NÝGGJAR LEIÐIR ....... 7

2.3 TILMÆLI ....... 10

*2.3.1 Almenn kunning og ráðgeving ....... 11*

*2.3.2 Limaskapur í millumlandafelagsskapum ....... 11*

*2.3.3 Tilmæli til verandi leiðir ....... 12*

*2.3.4 Onnur tilmæli ....... 12*

**3. BAKSTØÐI ....... 14**

3.1 BYGD FISKIVEIÐUVITAN ....... 14

3.2 FØROYSKUR KJARNUFØRLEIKI ....... 15

3.3 ALTJÓÐAGERÐ AV FISKIVINNUFYRITØKUM ....... 16

3.4 PRODUKTIVUR ÚTFLUTNINGUR ....... 16

3.5 EITT HAV AV MØGULEIKUM ....... 17

**4. ALTJÓÐA SPÆLIREGLUR ....... 18**

**5. VERANDI VEIÐUMØGULEIKAR ....... 19**

5.1 ÚTRÁS ....... 20

5.2 FRÆLSUR ARBEIÐSMARKNAÐUR ....... 20

**6. NÝGGJAR LEIÐIR ....... 23**

6.1 ÓKEND OG ÓREGULERAÐ ØKIR ....... 23

6.2 ÁHUGAVERD ØKIR INNANFYRI 200 FJÓRÐINGAR ....... 24

*6.2.1 Miseydnaðar royndir ....... 24*

*6.2.2 Fyritreytir ....... 25*

*6.2.3 Fyrireiking ....... 25*

*6.2.4 Kvotukeyp ella veiðubýti ....... 26*

6.3 REGIONALIR FELAGSSKAPIR ....... 27

*6.3.1 SEAFO ....... 29*

*6.3.2 CCAMLR ....... 30*

*6.3.3 SPRFMO ....... 31*

*6.3.4 SIOFA ....... 32*

**7. KELDUR ....... 33**

**FYLGISKJØL ....... 34**

**8. FYLGISKJAL 1. ALTJÓÐA SPÆLIREGLUR....................35**
8.1 SKYLDUR HJÁ FLAGGLANDINUM....................37
8.2 ST SAMTYKT FRÁ 2006 VIÐVÍKJANDI BOTNFISKISKAPI....................38
8.3 SKYLDUR HJÁ FLAGGLONDUM SAMBÆRT FISKASTOVNAAVTALUNI....................39
**9. FYLGISKJAL 2. VERANDI VEIÐUMØGULEIKAR....................41**
9.1 SÍNÁMILLUM AVTALUR....................41
*9.1.1 ES....................41*
*9.1.2 Norra....................43*
*9.1.3 Svalbard....................45*
*9.1.4 Russland....................47*
*9.1.5 Ísland....................49*
*9.1.6 Grønland....................50*
9.2 STRANDALANDAAVTALUR....................52
*9.2.1 Sild....................52*
*9.2.2 Makrelur....................57*
*9.2.3 Svartkjaftur....................57*
*9.2.4 Kongafiskur í Irmingerhavinum....................59*
9.3 MILLUMLANDAFELAGSSKAPIR Í NORÐURATLANTSHAVI....................61
*9.3.1 NAFO (Northwest Atlantic Fisheries Organization)....................61*
*9.3.2 NEAFC (Northeast Atlantic Fisheries Commission)....................66*
*9.3.3 NASCO....................70*
*9.3.4 ICCAT....................70*
**10. FYLGISKJAL 3. NÝGGJAR LEIÐIR....................72**
10.1 REGIONALIR FELAGSSKAPIR....................74
*10.1.1 SEAFO....................75*
*10.1.2 CCAMLR....................77*
*10.1.3 SPRFMO....................81*
*10.1.4 SIOFA....................85*
**11. FYLGISKJAL 4. TALVUR VIÐ VEIÐURÆTTINDUM....................86**

## 2. Samandráttur og tilmæli

Fiskivinnan hevur gjørt føroyingar ríkari. Síðani fiskivinnan byrjaði og tók dyk á seg, er livistøðið í Føroyum hækkað munandi. Orsøkin er, at føroyingar hava ein lutfalsligan fyrimun ímun til onnur lond at veiða fisk.

Síðani føroyingar rættiliga byrjaðu at veiða fisk, hava føroyingar bygt sær ein førleika og eina vitan um fiskiveiðu og veiðumannagongdir. Hesin førleiki kann síggjast sum ein vitanarkapitalur, sum føroyingar eiga. Um hesin vitanarkapitalur verður troyttur best møguligt, fáa vit sum mest av avkasti.

Vinnuháskúlin hevur klakt ein prúðan skara av skipsførarum og maskinmeistarum og ábendingar eru um, at ein rímiliga stórur partur av føroysku arbeiðsfjøldini hevur eina útbúgving innan fiskiveiðu. Útbúgvingin er bygd á aldarlangar fiskiveiðuroyndir, men eisini á føroyska umhvørvið, har sjógvurin er ein náttúrligur partur av tilveru føroyinga. Hesin gróðrarbotnur veitir føroyskum sjófólki ein fyrimun at búleikast á heimsins høvum.

Við omanfyrinevndu førleikum er eitt framkomið fiskivinnuumhvørvi sprottið, sum er eitt gott grundarlag at byggja á, tá farast skal út í heim at gagnnýta nýggjar veiðumøguleikar.

Fiskiveiðumøguleikar eru úti í heimi – á nýggjum leiðum, men eisini á verandi leiðum. Á pørtum av altjóða sjógvi er enn fríur fiskiskapur. Aðrir partar av altjóða sjógvi eru skipaðir undir fiskiveiðufelagsskapum, har Føroyar kunnu vera við í samstarvinum. Í heiminum er ein hópur av strandarlondum, sum hava ríkar veiðumøguleikar innan fyri sítt sjómark, og reiðarí eru úti í heimi, sum kunnu keypast upp.

Við at troyta okkara styrki innan fiskiveiðu og tvinna hana saman við veiðumøguleikum úti í heimi, er møguleiki fyri at skapa hægri útflutningsvirði uttan stórvegis størri nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi.

Vinnan skal hava høvuðsleiklutin í hesum arbeiði. Tað er ein spurningur um áhuga, dugnaskap og styrki hjá reiðaríum, um nýggjar verkætlanir skulu eydnast. Leikluturin hjá tí almenna er at kunna og ráðgeva reiðaríum, sum fara út í heim, og samtíðis hava eftirlit við atburði teirra.

Eftir hesum leisti fara føroysk sjófólk, føroysk reiðarí og føroysk fiskiveiðuvitan at skapa stór útflutningsvirðir til gagns fyri livistøðið í Føroyum.

## 2.1 Verandi leiðir

Politiski myndugleikin raðfestir fiskiveiðusamráðingar høgt. Samráðingar verða fyrireikaðar saman við vinnuni, og úrslitini hátta sær alt eftir, hvussu samráðingarnar ganga, og hvat verður latið ístaðin. Aðalmálið er at fáa sum mest burturúr fyri Føroyar.

Verandi veiðumøguleikar eru býttir í sínámillum avtalur, strandalandaavtalur og millumlandasamstarv. Sínámillum avtalur eru við ES, Noreg, Russland, Ísland og Grønland. Strandalandaavtalur eru um sild, makrel og svartkjaft, og samráðingar um strandalandaavtalu fyri kongafisk halda áfram. Føroyar hava somuleiðis fiskirættindi í NEAFC, NAFO og SPRFMO. Ávísir nýggir møguleikar eru at finna í hesum samstarvi. Hesir veiðumøguleikar eru greinaðir í fylgiskjali 2.

Føroysk reiðarí hava sambært lóg rætt til føroysku veiðurættindini til 2018. Hesi rættindi veita føroyskum reiðaríum eitt gott útgangsstøði og veita teimum møguleika til at hava eina trygga inntøku og við henni styrkja seg. Við hesari styrki og trygd skuldi verði møguligt hjá føroyskum reiðaríum at farið út í heim at

keypa sær atgongd til veiðurættindi undir øðrum flaggi. Hendan útrás kann gerast óheft av føroyska almenna myndugleikanum.

Trot er í løtuni á arbeiðsmegi í Føroyum. Stirvna útlendingalógin hevur við sær, at torført er at fáa fatur á skikkaðari arbeiðsmegi. Fyri at megna at kappast við útlendsk reiðarí, sum royna á somu leiðum og kappast um somu sølumarknaðir sum føroyingar, er kanska ein treyt, at lønarkostnaðurin verður javnsettur við fremmand reiðarí. Føroyingar eiga eisini veiðurættindi, sum ikki verða gagnnýtt, tí tað ikki loysir seg at troyta tey.

Tó eru serskipanir fyri reiðarí, sum virka á fjarskotnum leiðum. Føroysk reiðarí, sum hava skip, men sum ikki regluliga koma í føroyska havn, kunnu hýra útlendska arbeiðsmegi uttan arbeiðsloyvi. Galdandi frá 1. januar 2007 er undantak fyri útlendska manning umborð á skipum, sum fiska av kvotum, sum reiðaríið sjálvt hevur útvegað sær. Í tílíkum førum skal útlendska manningin ikki rinda skatt til Føroyar.

## 2.2 Nýggjar leiðir

Nýggju leiðirnar, sum Føroyar kunnu leggja seg eftir, kunnu býtast í tvey: Altjóða sjógvur og sjóøki innan fyri 200 fjórðingar. Níggju tíggindapartar av heimsveiðuni er innan fyri 200 fjórðingar, og áleið helvtin av heimsveiðuni, sum verður brúkt til matna, er smáveiða innanfyri 30 fjórðingar úr landi.

Altjóða sjógvur er fyri ein part reguleraður við regionalum felagsskapum/ samstarvi. Ein partur av heimsins høvum er enn ikki reguleraður, og tí kunnu møguleikar finnast har. Økir, sum kanska eru ókend fyri føroyingar, kunnu vera kend fyri onnur, tí onnur lond hava roynt á hesum økjum. Tí er sannlíkt, at vitan finst um hesi økir.

Nevndin hevur verið í samband við ymsar partar av vinnuni og út frá hesum samrøðum eyðmerkt týdningarmestu økini innan fyri 200 fjórðingar.

Tey lond, sum vinnan vísti áhuga fyri, eru Peru, Kili, Mauritania, Marokko, Senegal, Grønhøvdaoyggjar, Angola, Namibia, Mosambique, India, Brasilia og Falklandsoyggjarnar. Einasta staðið, har føroysk skip hava fiskað seinastu árini, er í Mauritania.

Føroyingar hava gjørt fleiri royndir á økjum úti í heimi, sum eru innanfyri 200 fjórðingar. Royndirnar hava verið mangar, men misjavnt hevur verið, hvussu tær hava hepnast. Høvuðsorsøkin var allarhelst hon, at reiðaríini ikki høvdu gjørt sítt heimaarbeiði.

Tað, sum serliga haltaði, var, at undirstøðukervið ikki var ílagi. Eisini høvdu reiðaríini ta fatan, at tey kundu taka ta vitan, sum tey høvdu um fiskiveiðu á norðurhøvum og føra hana yvir á ókendar fiskileiðir á Suðurhøvum. Men tað vísti seg, at alt var øðrvísi. Fiskurin háttaði sær øðrvísi, sjógvurin var øðrvísi, og amboðini kundu ikki brúkast í sama mun.

Fyritreytirnar undir hesum verkætlanum vóru frá uppruna skeivar, tí farið var út í heim av neyð, tí tað gekk so illa á verandi leiðum. Reiðaríini høvdu tí ikki styrkina til at gjøgnumføra eina munagóða roynd. Reiðarí skulu helst vera væl fyri og skulu hava eina trygga inntøkukeldu á verandi leiðum. Tá hava tey styrki til at leita sær út í heim eftir nýggjum leiðum.

Vinnan metir, at møguleikar eru úti í heimi – bæði í altjóða sjógvi og innanfyri 200 fjórðingar og metir, at tað almenna kann hava ein týðandi leiklut í arbeiðnum. Avgerðin skal sjálvsagt vera hjá reiðarínum, um tað ætlar sær inn á eina leið, men síðani kann tað almenna kunna um viðurskiftir á hesari leið.

Tað verður ikki komið nærri inn á, hvørji lond hava størsta týdning at leggja dentin á. Hesin spurningurin er upp til einstøku reiðaríini at meta um. Tað almenna kann seta arbeiðs- og fíggjarorku av til at kunna og ráðgeva reiðaríum um hesi lond. Eisini er almenna uppgávan at hava eftirlit við føroyskum skipum, so tey halda seg til føroyska lóggávu og tær skyldur, Føroyar hava í altjóða lóg.

Vinnuumboðini vóru á einum máli um, at almennu Føroyar ikki skulu keypa kvotur, men at hetta harafturímóti er ein uppgáva hjá vinnuni sjálvari. Heldur ikki varð hildið skilagott, at tað almenna fer í samráðingar við umbýti av veiðurættindum, tí hesi lond kanska ikki eru til reiðar til slíkt, og at vit hava ov lítið fiskatilfeingi at bjóða fram, sum ikki til fulnar verður gagnnýtt í dag.

Í hesum sambandi ger nevndin vart við, at møguleikar eru fyri samstarvi, har Føroyar veita fiskiveiðuvitan ímóti at fáa atgongd til fiskiveiðumøguleikar. Londini, sum hava ríkar fiskiveiðumøguleikar eru fyri tað mesta menningarlond. Menningarhjálp kann tí eisini veitast. Saman við atgongd til fiskiveiðumøguleikar kann hon økja livistøðið í menningarlandinum.

Gongdin í havrættinum hevur verið, at alsamt fleiri millumlandaskipanir eru settar í verk, sum avmarka rásarúmið í fiskiskapinum í altjóða sjógvi. Havrættarsáttmálin[1] og Fiskastovnaavtalan[2] leggja upp til samstarv millum lond, sum skal fara fram á regiónalum stigi við millumtjóða avtalum, skipanum ella felagsskapum. Skulu skip undir føroyskum flaggi fiska í altjóða sjógvi, er treytin, at vit halda okkum til altjóða leikreglur og fylgja teimum samtyktum, sum galda.

[1] United Nations Convention on the Law of the Sea

[2] Agreement for the Implementation of the Provisions of the UN Convention relating to the Conservation and Management of Straddling Fish Stocks and Highly Migratory Fish Stocks

Millumlanda felagskapir/samstarv, ið umsita fiskiskap í altjóða sjógvi, og sum eru viðgjørdir í hesari frágreiðing, eru:

- SEAFO, South-East Atlantic Fisheries Organization
- CCAMLR, Commission for the Conservation of Antarctic Marine Living Resources
- SPRFMO, South Pacific Ocean Regional Fisheries Organisation
- SIOFA, Southern Indian Ocean Fisheries Arrangement
- Samstarv í Norðurkyrrahavið millum Japan, Korea, Russland og USA.

Føroyar eru við í samráðingunum um at stovna SPRFMO, men luttaka ikki í hinum felagsskapunum. Frágreiðingin lýsir, hvør er limur í hesum felagsskapum, hvørji fiskasløg hava áhuga, og hvørjar treytirnar eru fyri at vera limur. Meira er at lesa um hesar felagsskapir seinni í frágreiðingini.

### 2.3 Tilmæli

Grundsjónarmiðið hjá nevndini er, at tað fyrst og fremst eru tey einstøku reiðaríini, sum skulu taka støðu til, um farast skal út í heim, og hvørji økir hava áhuga. Íløguna, vágan og vinningin eigur reiðaríið.

Føroysk reiðarí hava møguleikar til at fara at leita eftir nýggjum veiðumøguleikum, sum okkara veiðusøga hevur mong dømir um. Her er spurningurin um áhuga, evnir at skaffa vitan og styrki til at fara út at leita eftir lønandi fiskileiðum.

Almenna uppgávan er tvíbýtt. Tað almenna skal:

- veita føroyska vinnulívinum kunning og ráðgeving um viðurskiftir í øðrum londum.
- røkja og menna formligt samstarv við onnur lond og millumlanda-felagsskapir, umframt leiklutin sum eftirlitsmyndugleiki við føroyskum skipum.

Nevndin kemur tí við tveimum høvuðstilmælum, sum eru lýst niðanfyri. Tey eru (i) almenn kunning og ráðgeving og (ii) luttøka í millumlandafelagsskapum.

### *2.3.1 Almenn kunning og ráðgeving*

Nevndin metir, at arbeiðið at finna nýggjar veiðumøguleikar úti í heimi er eitt týðandi arbeiði, sum hevur við sær, at serligi føroyski veiðuførleikin verður troyttur best møguligt.

Mælt verður til, at arbeiðs- og fíggjarorka verður sett av til at veita føroyska vinnulívinum kunning og ráðgeving um viðurskiftir í øðrum londum.

Tørvur er tí á at styrkja verandi uttanríkistænastuna og bøta munandi um førleika og arbeiðsorku hjá Føroyum, tá tað snýr seg um fiskivinnumøguleikar á nýggjum leiðum. Mett verður, at hendan tænastan fer at kosta 2 mió. kr. um árið.

Nevndin ger eisini vart við, at ein týðandi uppgáva hjá politikarum er at skapa sambond og opna dyr úti í heimi fyri føroyskum fiskivinnufyritøkum.

### *2.3.2 Limaskapur í millumlandafelagsskapum*

Føroyar luttaka í NAFO, NEAFC og eru í samráðingum um at stovna SPRFMO, harí føroyingar hava veiðurættindi í altjóða sjógvi. Tríggir aðrir felagsskapir eru, sum er nevndir niðanfyri.

Mælt verður til, at Føroyar skulu gerast partur av samstarvinum/ felagsskapunum SIOFA, SEAFO og CCAMLR. Eisini skal virksemi í Norðurkyrrahavinum eygleiðast soleiðis, at Føroyar kunnu vera við, tá ið ein felagsskapur verður settur á stovn har. Mett verður, at grundgjaldið fyri at vera limur í øllum felagsskapunum verður 1,2 mió. kr. Síðani hækkar limagjaldið eftir nøgdini, sum

føroysk skip veiða á hesum leiðum. Umframt limagjaldið fer umsitingin at kosta Fiskimálaráðnum 1,5 mió. kr.

Torført kann vera at fáa veiðumøguleikar á hesum leiðum, tí veiðan longu er skipað, men um nýggir veiðumøguleikar stinga seg upp, fáa Føroyar sum luttakari møguliga sín part.

### *2.3.3 Tilmæli til verandi leiðir*

Ítøkilig tilmælir, sum vinnan er komin inn á, eru lodnuveiða í Vesturgrønlandi og lodnuveiða í NAFO-økið. Har er ein lodnustovnur, sum ikki verður gagnnýttur til fulnar í dag.

Um toskurin á Flemish Cap kemur fyri seg aftur, skulu Føroyar virka fyri at fáa sín part, sum tær eiga sambært veiðusøguni. Føroyar kunnu eisini bjóða seg fram til at gera neyðugu vísindarligu kanningarnar av toskastovninum á Flemish Cap fyri at skunda undir toskafiskiskapin har.

Umsókn um loyvi til royndarveiðu eftir svartkalva við Svalbard er send, og arbeitt skal vera víðari við hesum máli.

Toskafiskiskapurin í Grønlandi stingur seg mest sannlíkt uppaftur, og Føroyar skulu royna at fáa møguleika at veiða tosk í grønlendskum sjógvi.

Annars eru tilmælini kendar tillagingar til verandi sáttmálar, sum vanliga verða tiknar upp undir samráðingunum, og sum nevndar verða í fylgiskjali 2.

### *2.3.4 Onnur tilmæli*

Fyri at megna at kappast á nýggjum og ókendum leiðum, er ein gongd leið at skipa so fyri, at føroysk reiðarí verða javnsett í rakstrarkostnaði við fremmand

reiðarí. Føroyingar eiga eisini veiðurættindi, sum ikki verða gagnnýtt, tí tað ikki loysir seg at troyta hesar møguleikar. Mælt verður tí til, at føroysk skip fáa loyvi til at hýra kappingarføra útlendska arbeiðsmegi.

Nevndin ger vart við, at møguleiki kann vera at finna nýggjar veiðumøguleikar við at granska í nýggjum veiðuhættum, har nýggj amboð kunnu spretta, sum høvdu økt um produktivitetin umborð á fiskiskipum.

Nevndin ger eisini vart við, at møguleikar kunnu vera longri niðri í føðiketuni. Møguleiki er ikki fyri hesari veiðu í dag, tí tøknin ikki er funnin og mannagongdirnar ókendar. Heldur eingin vissa er fyri, at slíkur fiskiskapur er lønandi.

Eitt sindur er kannað um veiðu av prikkafiski, men her er tøknin og vitanin enn ov lítil. Norra hevur gjørt royndir í Suðuríshavinum at veiða krill, og ábendingar eru nú um, at hendan veiðan við nýggjari veiðutøkni kann verða lønandi.

Ríkir møguleikar kunnu vera í hesum og ein háttur at økja um avkastið av náttúrutilfeinginum. Tí leggur nevndin upp til, at hetta økið í framtíðini verður viðgjørt.

Føroyar kunnu styrkja sín leiklut í altjóða samstarvi við at veita granskingarorku úr Føroyum. Tað kann veita Føroyum ein ágóða, samtíðis sum tað hevur týdning, tá ið stovnurin verður býttur. Mælt verður til, at granskingarorka verður avsett til millumlandafiskivinnusamstarv.

# 3. Bakstøði

Fiskivinnan hevur gjørt føroyingar ríkari. Síðani fiskivinnan byrjaði og tók dyk á seg, er livistøðið í Føroyum hækkað munandi. Orsøkin er, at føroyingar hava ein lutfalsligan fyrimun ímun til onnur lond at veiða fisk. Við at útflyta fisk kunnu føroyingar innflyta alskyns vørur, sum nøkta tørv føroyinga.

Vit verða ríkari, tí vit brúka lutfalsliga lítla arbeiðsmegi til at útflyta fisk fyri at innflyta hópin av vørum, sum vit annars høvdu brúkt lutfalsliga nógva arbeiðsmegi til at framleitt.

Samhandil við onnur lond er bygdur á, at hvørt landið sær skal fáast við tað, sum tað lutfalsliga megnar best og síðani lata onnur lond framleiða hinar vørurnar, sum tey lutfalsliga megna best. Við at býta um vørur, verða øll ríkari. Orsøkin til arbeiðsbýtið er, at arbeiðsmegin er avmarkað.

## 3.1 Bygd fiskiveiðuvitan

Síðani føroyingar rættuliga byrjaðu at veiða fisk, hava føroyingar bygt sær ein førleika og eina vitan um fiskiveiðu og veiðumannagongdir. Hesin førleiki kann síggjast sum ein vitanarkapitalur, sum føroyingar eiga.

Við at troyta hendan kapitalin best møguligt fæst sum mest av avkasti. Hetta er orsøkin til, at betri er at troyta hendan humana kapitalin enn at fara at byggja nýggjan humanan kapital innan meira ókendar vinnur.

Vit hava servitan og royndir innan fiskiskap, og vit hava effektiviserað flotan í nógv ár, sum merkir, at vit fáa fiskin bíligari úr sjónum, enn vit fingu fyrr. Talið av fiskimonnum í føroyska flotanum er eins og í hinum londunum á okkara leiðum lækkað og fer at lækka so hvørt, sum flotin verður effektivari.

Tí kann roknast við, at tað er ein førleiki innan fiskiveiðu, sum ikki fer at vera troyttur. Hesir persónar kunnu sjálvsagt fáa sær eina aðra útbúgving ella við náttúrligari frágongd finna sær eitt annað starv.

Men ein góður møguleiki er at fara at troyta hendan serliga førleika við at finna nýggjar veiðumøguleikar, har avkastið verður størri av hesari arbeiðsmegi enn avkastið annars hevði verið, um hesir persónar fara at arbeiða í eini aðrari vinnu, har teir kanska skulu lærast av nýggjum.

### 3.2 Føroyskur kjarnuførleiki

Sum sagt omanfyri hava føroyingar ein førleika um fiskiveiðu og veiðumanna-gongdir. Úr hesum er eitt framkomið fiskiveiðuumhvørvi runnið.

Stutt frástøða er millum fiskiveiðu og fyritøkur, sum framleiða reiðskap og sjótøkni. Samspælið millum reiðarí og reiðskapsfyritøkur gevur eitt umhvørvi, har kræsin krøv vera sett og kræsin krøv verða nøktað.

Kræsni tørvurin, sum sprettir úr einum slíkum umhvørvi, eggjar reiðskaps-fyritøkum at skapa nýskapandi loysnir, ið megna at loysa fløktar avbjóðingar, sum framkomni fiskiflotin hevur í tí kappingarkenda umhvørvi, hann búleikast í. Føroyar eru staðið, har fiskiveiðuvitan verður varðveitt og betra hvønn dag.

Vinnuháskúlin hevur klakt ein prúðan skara av bæði skipsførarum og maskinmeistarum. Ábendingar eru um, at ein rímiliga stórur partur av føroysku arbeiðsfjøldini hava eina útbúgving innan fiskiveiðu.

Útbúgvingin er bygd á aldarlangar fiskiveiðurondir, men eisini á føroyska umhvørvið, har sjógvurin er ein náttúrligur partur av tilveru føroyinga. Hesin gróðrarbotnur veitir føroyskum yvirmonnum ein fyrimun at búleikast á heimsins sjey høvum. Teir hava lætt við at taka til sín nýggja vitan, tøkni og mannagongdir, sum betra um teirra avrik á sjónum.

Ein háttur at troyta hesa arbeiðsmegi best møguligt er at økja veiðumøguleikarnar úti í heimi. Saman við fremmandari arbeiðsmegi kann hon skapa stór virðir og harvið verða produktivari.

### 3.3 Altjóðagerð av fiskivinnufyritøkum

Føroyskt reiðarí, sum bert dúvar uppá eitt fiskaslag ella bert dúvar uppá føroyskt sjóøki er fongt við stórum vága, tí minkar fiskurin ella prísurin fellur, er fyritøkan viðbrekin. Við at fara inn á aðrar leiðir, spjaðist vágin, og fyritøkan hevur betri møguleikar fyri at verja seg ímóti sveiggjum, sum koma kunnu.

Ein ágóði av slíkum er, at eftir hesum leisti kunnu føroysk reiðarí skaffa sær inntøku uttanlands og eru tí ikki so nógv ávirkað av, hvussu tað gongur búskaparliga í Føroyum.

Ein annar ágóði er, at fyritøkur verða altjóðagjørdar og kunnu tí vinna sær vitan aðrastaðni og fáa atgongd til kapital og vakstrarmøguleikar aðrastaðni. Eisini er møguleiki fyri at fáa fatur á arbeiðsmegi, sum er torfør at skaffa í Føroyum.

### 3.4 Produktivur útflutningur

Útflutningur í sær sjálvum ger okkum ikki ríkari, men útflutningur, har hýran til føroysku manningina er høg og avkastið til reiðaran er høgt, ger okkum ríkari. Við at serligi føroyski veiðuførleikin fer út í heim at skapa virðir saman við fremmandari arbeiðsmegi fer tað at økja um tilfeingisavkastið.

Eitt endamál í sær sjálvum er, at so fá sum gjørligt skapa neyðuga útflutningin, tí so kann størri partur av arbeiðsmegini arbeiða í heimamarknaðarvinnuni, sum kann tæna okkum við vørum og tænastum, sum vit hava tørv á.

Øktur útflutningur er bert ílagi, um tær vørur og tænastur, sum vit kunnu fáa fyri økta útflutningin, nøkta okkara tørv betri enn tær heimamarknaðarvørur, sum vit ikki kunnu fáa, tí hesi eru farin at arbeiða við útflutningi.

Føroyar kunnu troyta serliga føroyska veiðuførleikan betri við lítlari nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi. Við hesum skuldi verði møguligt, at framleitt fremmant gjaldoyra, sum vit annars bert kunnu skapa við størri tilfeingisnýtslu. Eftir hesum leisti hækkar livistøðið í Føroyum.

### 3.5 Eitt hav av møguleikum

FAO førir fram, at vit hava mest sannlíkt rokkið ta nøgd, sum heimsins sjógvur kann veita. Veiðan øktist nógv frá 1950 og fram til síðst í 80unum. Síðani hevur veidda nøgdin ligið støðug á umleið 100 milliónum tonsum um árið.

FAO, millumlandafelagsskapir og fiskiveiðulond ásanna, at vit hava rokkið málinum, og at vit skulu vera varin og royna at varðveita og byggja uppaftur stovnar, sum eru illa fyri. Tí tykist tað, sum lítið er at fara eftir hjá nýggjum slóðbrótarum og brasnum vinnulívsfólki, sum søkja nýggjar leiðir og nýggj mið.

Um hugt verður eftir heiminum, eru fiskileiðir, har eingin regulering er. Eisini eru leiðir reguleraðar, har Føroyar ikki luttaka. Nógvir ótroyttir møguleikar eru eisini innan fyri 200 fjórðinga fiskimark.

Nevndin vil eisini gera vart við, at møguleikar eru longri niðri í føðiketuni. Eitt sindur er kannað um veiðu av prikkafiski, men tøknin og vitanin er enn ov lítil. Norra hevur gjørt royndir í Suðuríshavinum at veiða krill, og ábendingar eru um, at hendan veiðan við nýggjari veiðutøkni kann verða lønandi.

Nevndin nevnir hendan møguleikan, sum kann vera ein háttur at økja um avkastið av náttúrutilfeinginum. Tí leggur nevndin upp til at hetta økið í framtíðini verður viðgjørt.

## 4. Altjóða spælireglur

Rætturin at veiða fisk er býttur í sjóøki innanfyri 200 fjórðingar og altjóða sjógv. Innanfyri 200 fjórðingar hevur strandarlandið allan ræðisrættin og kann loyva øðrum at veiða í sínámillum landasáttmálum.

Í altjóða sjógvi er sum høvuðsregla fríur fiskiskapur. Væntandi er, at allur altjóða sjógvur við tíðini verður reguleraður. Tí er neyðugt, at farið verður út í heim, áðrenn allur sjógvur er reguleraður. Økir eru, sum eru skipað við millumlanda-felagsskapum so sum NAFO og NEAFC, og strandalandasáttmálum, sum vit kenna viðvíkjandi sild, makreli og svartkjafti.

Heimsins veiðusøga sigur frá, at ov stórt veiðutrýst viðførdi, at fleiri stórir fiskastovnar vóru nærum avoyddir. Hendan gongdin bar í sær, at heimssamfelagið ynskti at minka um ovurnýtsluna. Mest umfatandi broytingin var, tá sjómarkið kundi flytast út á 200 fjórðingar.

Grundstøðið undir umsitingini av havumhvørvinum er Havrættarsáttmáli Sam-eindu Tjóða. Sáttmálin ásetir eina almenna skyldu fyri øll lond at seta í verk neyðug tiltøk fyri at varðveita og byggja uppaftur livandi tilfeingi í altjóða sjógvi, sum gevur best møguliga burðardygga troyting í framtíðini.

Í 1995 varð avgjørt at seta í verk ásetingar um varðveitslu og umsiting av ferðandi fiskastovnum – nevnd ST-fiskastovnaavtalan. Sambært fiskastovnaavtaluni, sum Føroyar hava bundið seg til, hava flagglond skyldu til at ansa eftir, at tess skip ikki fáast við virksemi, sum máar støðið undan tí ávirkan, sum tiltøkini hava.

Sambært lóg um vinnuligan fiskiskap skulu fiskifør undir føroyskum flaggi hava veiðiloyvi og fiskiloyvi til at veiða í altjóða sjógvi. Flagglandið skal bert loyva fiskiskapi í altjóða sjógvi, um tað er ført fyri at tryggja, at skipið heldur tær altjóða reglur, landið hevur bundið seg til. Meira er at lesa um altjóða spælireglur í fylgiskjali 1.

## 5. Verandi veiðumøguleikar

Fyrri partur av arbeiðssetninginum er at lýsa nýggjar veiðumøguleikar uttan fyri føroyskt sjóøki, har føroyingar veiða í dag.

Politiski myndugleikin raðfestir fiskiveiðusamráðingar høgt. Samráðingar verða fyrireikaðar saman við vinnuni, og úrslitini hátta sær alt eftir, hvussu samráðingarnar ganga, og hvat verður latið ístaðin.

Verandi veiðumøguleikar eru býttir í sínámillum avtalur, strandalandaavtalur og millumlandafelagsskapir. Hesir veiðumøguleikar eru greinaðir í fylgiskjali 2.

Ítøkilig tilmælir, sum vinnan er komin inn á eru lodnuveiða í Vesturgrønlandi og lodnuveiða í NAFO-økið.

Um toskurin stingur seg upp aftur á Flemish Cap, skulu Føroyar royna at fáa sín part, sum tær eiga sambært veiðusøguni. Føroyar kunnu eisini bjóða seg fram til at gera neyðugu vísindarligu kanningarnar av toskastovninum á Flemish Cap fyri at skunda undir toskafiskiskapin har.

Umsókn um loyvi til royndarveiðu eftir svartkalva við Svalbard er send, og arbeitt skal vera víðari við hesum máli.

Toskafiskiskapurin í Grønlandi stingur seg mest sannlíkt uppaftur, og Føroyar skulu royna at fáa toskakvotu í grønlendskum sjógvi.

Annars eru tilmælini kendar tillagingar til verandi sáttmálar, sum vanliga verða tiknar upp undir samráðingunum. Meira er at lesa um hetta í fylgiskjali 2.

## 5.1 Útrás

Føroysk reiðarí hava í føroysku lóggávuni rætt til føroysku veiðurættindini til 2018. Hetta borgar fyri, at føroysk reiðarí hava eitt gott útgangsstøði og hava møguleika at hava eina trygga inntøku og við tí styrkja seg. Við hesari styrki og trygd skuldi verði møguligt hjá føroyskum reiðaríum at farið út í heim og keypt sær atgongd til onnur veiðurættindi.

Hetta er bert spurningur um áhuga, dugnaskap og styrki hjá føroyskum reiðaríum. Hendan útrás kann gerast óheft av politiska myndugleikanum, tí nýggju veiðumøguleikarnir eru undir øðrum flaggi.

Úti í heimi eru veiðumøguleikar, sum kunnu keypast. Við at keypa fremmand reiðarí er møguleiki bæði fyri atgongd til annan sjógv, men sum eisini veitir atgongd til øðrvísi fiskiveiðuvitan. Synergieffektin liggur í tí vitan, sum føroyska reiðaríið kann veita fremmanda reiðarínum.

Um so er, at eitt føroyskt reiðarí hevur áhuga í einum veiðumøguleika, sum føroyski myndugleikin ikki kann veita, men har ein fremmandur myndugleiki hevur avgerðarrættin, kann verða møguligt at keypa eitt reiðarí, sum hevur fingið loyvi frá hesum myndugleika.

## 5.2 Frælsur arbeiðsmarknaður

Trot er í løtuni á arbeiðsmegi í Føroyum. Stirvna útlendingalógin hevur við sær, at torført er at fáa fatur á skikkaðari arbeiðsmegi. Sum er, kann arbeiðsmegi bert flyta frítt millum Norðanlond.

Fyri at megna at kappast við útlendsk reiðarí, sum royna á somu leiðum sum føroyingar, er kanska neyðugt, at lønarkostnaðurin verður javnsettur við fremmand reiðarí. Føroyingar eiga veiðurættindi, sum ikki verða gagnnýtt, tí tað ikki loysir seg at fáa tilfeingið úr sjónum.

Danska útlendingalógin krevur, at fremmand arbeiðsmegi, sum skal hava arbeiðsloyvi, hevur sáttmála við arbeiðsgevara, sum ásetir, hvørja løn viðkomandi skal hava og sum Innlendismálaráðið eisini skal góðkenna.

Danska útlendingalógin sigur, at skip, sum ikki regluliga koma í føroyska havn, kunnu hýra manning uttan arbeiðsloyvi. Hetta merkir, at reiðarí, sum virka í eitt nú Suðurkyrrahavinum ella í Mauritania, sleppa undan at søkja um uppihalds- og arbeiðsloyvi.

Útlendsk manning umborð á skipi skrásett við heimstaði í Føroyum, verður vanliga skattað í Føroyum av hesi inntøku.

Galdandi frá 1. januar 2007 er undantak gjørt fyri útlendska manning umborð á fiskiskipi, sum siglir uttanfyri føroysku landleiðirnar, og sum fiskar av kvotum, sum reiðaríið sjálvt hevur útvegað sær. Í tílíkum førum, skal útlendska manningin ikki rinda skatt til Føroyar.

Undantakið er bert galdandi, tá eitt reiðarí sjálvt hevur útvegað sær kvotur at fiska av. Undantakið er ikki galdandi, um fiskað verður av kvotum, sum Føroyar sum land hava útvegað sær.

Fyri at veiðan frá fiskiskapi í altjóða sjógvi við skipum skrásettum í Føroyum skal metast sum upprunavøra, skal skipari og yvirmanning vera íbúgvar í Føroyum ella ríkisborgarar í ES-limalondunum og í minsta lagi 75% av manningini skulu vera íbúgvar í Føroyum ella ríkisborgarar í ES-limalondunum.

Øll skip, skrásett í Føroyum, eru undir somu treytum eftir lóg um trygd á sjónum. Tað er sostatt ikki munur á, um skipið siglir/fiskar í føroyskum sjógvi ella í altjóða sjógvi.

Føroysk reiðarí, sum keypa kvotur í fremmandum sjógvi og ikki regluliga brúka føroyska havn, arbeiða á einum frælsum arbeiðsmarknaði, har tey eru javnsett við fremmand reiðarí.

Men fyri reiðarí, sum sjálvi hava skaffað sær veiðurættindini – eitt nú veiðurættindini í Suðurkyrrahavinum – men sum nú eru vorðin føroysk veiðurættindi, tí Føroyar eru limur í hesum fiskiveiðufelagsskapi, skal manningin rinda skatt í Føroyum. Hetta kann vera ein trupulleiki fyri kappingarføri hjá hesum reiðaríum.

Trupulleikin við fiskatilfeingi, sum ikki loysir seg at veiða – eitt nú rækjur á Flemish Cap – verður ikki loystur við verandi skipan. Rækjurnar á Flemish Cap verða veiddar av skipum sum regluliga koma í føroyska havn.

Fyri at loysa hesar trupulleikar er ein møguleiki at opna arbeiðsmarknaðin, har fremmand arbeiðsmegi kann brúkast á føroyskum skipum. Um grundleggjandi broytingar verða gjørdar viðvíkjandi nýtslu av fremmandari arbeiðsmegi óheft av føroyskum sáttmálum, kunnu slíkir møguleikar troytast.

Hetta hevði veitt tríggjar ágóðar:

(i) Lættari verður at skaffa arbeiðsmegi

(ii) Føroyingar kunnu fara at gera okkurt annað, sum hevur teirra áhuga og veitir hægri løn

(iii) Lítla føroyska arbeiðsmegin, sum verður eftir umborð á fiskiskipum, kann skapa stór virðir saman við útlendsku arbeiðsmegini uttan høga nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi.

# 6. Nýggjar leiðir

Seinni partur av arbeiðssetninginum er at lýsa nýggjar veiðumøguleikar uttan fyri føroyskt sjóøki, har føroyingar ikki veiða í dag.

Nýggju leiðirnar, sum Føroyar kunnu leggja seg eftir, kunnu býtast í tvey: Altjóða sjógvur og sjóøki innan fyri 200 fjórðingar. Níggju tíggindapartar av heimsveiðuni er innan fyri 200 fjórðingar, og áleið helvtin av heimsveiðuni, sum verður brúkt til matna, er smáveiða innanfyri 30 fjórðingar úr landi.

Altjóða sjógvur er fyri ein part reguleraður við millumlandafelagsskapum. Fáar - fyri føroyingar - kendar fiskileiðir eru, sum ikki eru reguleraðar antin við felagsskapum ella øðrum skipanum.

Lýsingin av nýggjum leiðum er býtt í trý. Fyrst verður ásannað, at ókend og óregulerað økir eru; síðani verða áhugaverd økir innan fyri 200 fjórðingar nevnd, har eisini verður greitt frá, hvat vinnan metir skal til, fyri at slíkar verkætlanir skulu eydnast. Síðst verða ymsu millumlandafelagsskapirnir viðgjørdir.

## 6.1 Ókend og óregulerað økir

Ein partur av heimsins høvum eru enn ikki reguleraður, og tí kunnu kanska møguleikar finnast.

Økir, sum eru ókend fyri føroyingar, kunnu vera kend fyri onnur. Onnur lond hava roynt á heimsins høvum – eitt nú russar og spaniólar. Tí er sannlíkt, at vitan finst um hesi økir.

Fyri at fara at royna á hesum økjum er neyðugt, at vitanin verður funnin – antin av tí almenna ella av privatu reiðaríunum. Tí verður í tilmælinum lagt upp til, at tað almenna setir arbeiðsorku av til hetta arbeiðið.

## 6.2 Áhugaverd økir innanfyri 200 fjórðingar

Nevndin hevur verið í sambandi við ymsar partar av vinnuni og við støði í hesum samrøðum eyðmerkt týðandi økir innan fyri 200 fjórðingar.

Tey lond, sum vinnan vísti áhuga fyri, eru Peru, Kili, Mauritania, Marokko, Senegal, Grønhøvdaoyggjar, Angola, Namibia, Mosambique, India, Brasilia og Falklandsoyggjarnar. Einasta staðið har føroysk skip veiða í løtuni er í Mauritania.

### *6.2.1 Miseydnaðar royndir*

Føroyingar hava úti í heimi gjørt fleiri royndir á økjum, sum eru innanfyri 200 fjórðingar. Nevnast kunnu royndir í Senegal, Namibia, Costa Rica og Angola. Eisini hava føroyingar drúgvar royndir í Suðurafrika og í Marokko.

Næstan allar royndirnar hava verið eftir uppisjóvarfiski – einamest sardinum, rossamakreli og sildafiski. Onkur royndin hevur verið eftir botnfiski so sum heyki. Í Senegal varð roynd gjørd at stovna virki á landi, sum tók ímóti fiski.

Royndirnar hava verið mangar, men til ber at siga, at tær ikki hava eydnast. Høvuðsorsøkin er allarhelst hon, at reiðaríini ikki gjørdu sítt heimaarbeiði.

Tað, sum serliga haltaði, var, at undirstøðukervið ikki var ílagi. Eisini høvdu reiðaríini ta fatan, at tey kundu taka ta vitan, sum tey høvdu um fiskiveiðu á norðurhøvum og føra hana yvir á ókendar fiskileiðir í Suðurhøvum.

Tað vísti seg tó, at alt var øðrvísi. Fiskurin háttaði sær øðrvísi, sjógvurin var øðrvísi, og amboðini kundu ikki brúkast í saman mun. Eisini varð ásannað, at frystiskip egna seg best á slíkum leiðum.

### *6.2.2 Fyritreytir*

Fyritreytirnar undir hesum verkætlanum vóru frá uppruna skeivar, tí farið var út í heim av neyð, tí tað gekk so illa á verandi leiðum. Reiðaríini høvdu tí ikki styrkina til at gjøgnumføra eina munagóða roynd.

Reiðarí skulu helst vera væl fyri og skulu hava eina trygga inntøkukeldu á verandi leiðum. Tá hava tey styrki til at leita sær út í heim eftir nýggjum leiðum.

Tað er vanliga skilagott at hava nøkur spurnartekin at arbeiða við, meðan reiðaríið vinnur pening á sínum kjarnuøki. Við øðrum orðum at fyrireika aðrar alternativar vinnumøguleikar. Tá so kjarnuøkið byrjar at geva minni, kann vera, at tað spurnarteknið, sum reiðaríið hevur arbeitt við, er vorðið ein stjørna og byrjar at kasta av sær.

Eitt reiðarí, sum bert arbeiðir við at heysta og ikki menna, fylgir einari stutttíðar-ætlan, og livitíðin kann gerast stutt og stokkut. Tí er skilagott, at føroysk reiðarí royna at finna nýggja leið, sum í byrjanini kann tykjast eitt spurnartekin, men sum frálíður kanska verður eitt gott íkast til raksturin.

### *6.2.3 Fyrireiking*

Vinnan metir, at møguleikar eru úti í heimi – bæði í altjóða sjógvi og innanfyri 200 fjórðingar og metir, at tað almenna kann hava ein týðandi leiklut í arbeiðnum.

Avgerðin skal sjálvsagt vera hjá reiðarínum, um tað ætlar sær inn á eina ávísa leið. Skilagott er, at reiðaríið ger neyðugu forkanningarnar, sum áseta, hvønn atburð reiðarí skulu hava í nýggja landinum. Røttu fiskiveiðuamboðini, sum hóska seg best at brúka, skulu finnast, og eyðmerkjast skal, hvør situr inni við fiskiveiðuvitan á hesum leiðum.

Neyðugt er at kortleggja undirstøðukervi bæði viðvíkjandi sølu av fiski, men ikki minst fyri proviantering, bunkring og av og áskipan av manning.

Neyðugt er at góðskumeta vinnuumhvørvið, sum reiðaríið fer at virka í, og ikki minst, at avtalur, fiskiloyvir v.m. eru løgfrøðiliga ílagi soleiðis, at reiðaríið kennir seg trygt at virka á fremmandu leiðini.

Tað hevur týdning, at bæði stjórn og fólkið, sum har býr, í mesta mun taka undir við, at eitt fremmant reiðarí úr Føroyum veiðir á teirra øki. Tí hevur uttanríkispolitikkur og uttanríkistænasta stóran týdning – eitt nú at politiski myndugleikin fer á almenna vitjan fyri at skapa samband, skapa loyalitet og opna dyr fyri føroyskum reiðaríum. Ein týðandi uppgáva hjá føroyskum politikarum er at vera við, tá ið føroyskt vinnulív fer út um landoddarnar at vinna sær marknaðarpartar ella finna nýggjar møguleikar.

Vinnan vísti á, at verkætlanir úti í heimi kunnu vera somikið stórar og vágakendar, at útlendskur kapitalur skal til fyri at kunna reisa eina slíka verkætlan. Útlendskur eigaraskarin kann í mesta lagi vera ein triðingur í einum føroyskum reiðaríi. Hetta kann vera ein forðing fyri, at føroysk reiðarí fara inn í stórar verkætlanir saman við útlendingum.

Tað verður ikki komið nærri inn á, hvørji lond hava størsta týdning at leggja dentin á, ella hvørji lond, tað almenna mælir reiðaríum til at fara at veiða í.

Hesin spurningurin er upp til einstøku reiðaríini at meta um. Tað almenna kann seta arbeiðs- og fíggjarorku av til at kunna og ráðgeva reiðaríum um hesi lond.

### *6.2.4 Kvotukeyp ella veiðubýti*

Vanligi hátturin at fáa atgongd til fremmandan sjógv innanfyri 200 fjórðingar er í samráðingum millum myndugleika at býta um veiðumøguleikar hjá hvørjum øðrum. Føroyar hava møguleika fyri at seta seg í samband við avvarandi lond, um mett verður, at tørvur er á tí og royna at samráða seg fram til veiðurættindini við at bjóða teimum inn í føroyskt sjóøki at veiða.

Hin hátturin er, at almenna Føroyar keypir kvotur á fjarleiðum. Ein slíkur handil kann skipast á tann hátt, at landið keypir kvotur og bjóðar tær út til føroysk reiðarí.

Vinnuumboðini vóru á einum máli um, at almenna Føroyar ikki skal keypa kvotur, men at hetta er ein uppgáva hjá vinnuni.

Heldur ikki verður hildið skilagott, at tað almenna fer í samráðingar við umbýti av veiðurættindum, tí hesi lond kanska ikki eru til reiðar til slíkt, og at vit hava ov lítið tilfeingi at bjóða fram, sum ikki til fulnar verður gagnnýtt í dag.

### 6.3 Regionalir felagsskapir

Havrættarsáttmálin og Fiskastovnaavtalan leggja upp til millumlandasamstarv, sum skal fara fram á regionalum stigi við millumlandafelagsskapum.

Spurningurin er, hvørjar treytirnar eru fyri at gerast partur av felagsskapum, hvat skal til fyri at lúka hesar treytir, og hvat vit fáa burtur úr møguleikunum.

Fiskstovnaavtalan frá 1995 hevur á trimum økjum ásetingar, sum snúgva seg um nýggjar limir ella luttakarar í regionalum samstarvi.

- Lond, sum hava veruligan áhuga (real interest) í fiskiveiðu í økinum, kunnu gerast limir. Nær eitt land hevur veruligan áhuga er ikki greinað í avtaluni.
- Lond, sum eru limir, skulu fylgja teimum samtyktum og skipanum, sum eru galdandi í felagsskapinum.
- Rættindini hjá limalondunum eru greinað, sum t.d. verða bygd á, hvussu støðan hjá fiskastovnunum er, og hvussu stór verandi fiskiorka á leiðini er, umframt tørvin hjá strandalondum og fiskiveiðisamfeløgum.

Skulu skip undir føroyskum flaggi fiska í altjóða sjógvi, er treytin, at vit halda okkum til altjóða leikreglur og fylgja teimum samtyktum, sum galda.

Sambært uttanríkisheimildarlógini er formliga luttøka Føroya í bindandi millumlanda sáttmálum “Kingdom of Denmark in respect of the Faroe Islands”. Um Grønland eisini hevur áhuga í at luttaka í slíkum samstarvi, verður talan um felags limaskap við Grønland (DFG), eins og í verandi samstarvi í Norðuratlantshavinum (NEAFC, NAFO og NASCO), uttan so ein sáttmáli loyvir øðrum eindum enn ríki at vera fullir limir.

Felagskapirnir, ið verða umrøddir, eru hesir:

- SEAFO, South-East Atlantic Fisheries Organization
- CCAMLR, Commission for the Conservation of Antarctic Marine Living Ressources.
- SPRFMO, South Pacific Ocean Regional Fisheries Agreement
- SIOFA, Southern Indian Ocean Fisheries Arrangement

Á mynd 1 niðanfyri er kort yvir, hvørjir felagsskapir eru, og hvat havumráðið talan er um.

Mynd 1. Heimskort við regionalum fiskiveiðufelagsskapum.




Kelda: IIU Fishing Coordination Unit. Closing the Net.

Í Norðurkyrrahavinum er eitt samstarv byrjað. Í februar 2007 samdust Japan, Korea, Russland og USA um fyribils tiltøk at verja vistskipanina og at tryggja burðardygga gagnnýtslu av botnfiski í útnyrðingspartinum av Norðurkyrrahavinum. Hetta var liður í áhaldandi samráðingum um at gera ein nýggjan felagsskap at regulera botnfiskiskap í altjóða sjógvi á hesum leiðum. Tað er skilagott, um Føroyar eygleiða, hvat hendir í Norðurkyrrahavinum.

NAFO og NEAFC saman við NASCO og ICCAT eru lýstir í fylgiskjali 2 og vera tí ikki viðgjørdir her. Meira er at lesa um felagsskapirnar í fylgiskjali 3.

### *6.3.1 SEAFO*

SEAFO var settur á stovn við sáttmála, sum kom í gildi í 2003. Økið hjá felagsskapinum er altjóða sjógvur í landsynningspartinum av Atlantshavinum suður ímóti CCAMLR-økinum.

Luttakarar eru Angola, Namibia, Noreg og ES. *Non-member signatories* eru Suðurafrika, Stórabretland (on behalf of St. Helena and its dependencies of Tristan da Cuhna and Ascension Island), Ísland, Suðurkorea og USA.

Fiskiskapurin hevur ikki verið stórur, men áhugin fyri at royna har hevur verið vaksandi seinastu árini. Høvuðssløgini eru patagonskur tannfiskur, búrfiskur, alfonsino og djúphavskrabbi.

Higartil hevur felagsskapurin samtykt skipanir fyri eftirlit við fiskiskapinum. Talan er m.a. um fylgisveinaeftirlit við fiskiførum og havnaeftirlit við útlendskum skipum. SEAFO hevur ikki sett heildarkvotur og kvotur fyri fiskastovnar ella býtt fiskirættindi. Heldur ikki eru hámarksveiða ella aðrar samtyktir gjørdar fyri uppsjóvarfisk.

Føroysk skip hava ikki fiskað í SEAFO-økinum, síðani felagsskapurin varð stovnaður. Skulu skip undir føroyskum flaggi fiska á hesum leiðum, er treytin, at føroyskir myndugleikar samstarva um umsiting av fiskastovnunum. Hetta kann

gerast við limaskapi í SEAFO ella í minsta lagi við at fylgja reglunum, sum SEAFO setir. Ein trong tulking av felagsskapinum sigur, at Føroyar ikki kunnu gerast ein formligur partur av SEAFO sum limur.

### *6.3.2 CCAMLR*

CCAMLR-sáttmálin kom í gildi 1982 og fevnir um alt sjóøkið í Suðuríshavinum sunnanfyri 60º S.

Limir í CCAMLR eru Argentina, Australia, Belgia, Brasilia, Chile, EF, Frakland, Týskland, India, Italia, Japan, Namibia, New Zealand, Noreg, Póland, Russland, Suðurafrika, Suðurkorea, Spania, Svøríki, Ukraina, UK, USA og Uruguay. Lond sum eru partur av konvensjónini, men ikki limir í Kommisjónini eru Bulgaria, Cook Islands, Finnland, Grikkaland, Kanada, Kina, Mauritius, Niðurlond, Peru og Vanuatu.

Høvuðsfiskasløgini í vinnuliga fiskiskapinum, roknað í nøgd, eru tannfiskur, krill og mackerel icefish. Serliga hevur verið stórur áhugi fyri tannfiski, sum samstundis er tað fiskaslagi, CCAMLR hevur mest reguleringar fyri.

Nevndin í CCAMLR hevur síðani felagsskapurin varð stovnaður, samtykt eina ørgrynnu av skipanum fyri at varðveita og umsita livandi tilfeingi í sjónum.

CCAMLR samtykkir á hvørjum ári tilmæli um heildarkvotur fyri fiskaskapin í økinum. Heildarkvoturnar verða ikki býttar út á limalondini. Í onkrum førum verða heildarkvoturnar tó býttar eftir avtalu millum londini, sum taka lut í av-varandi fiskiskapi. Fyri krill er samtyktar heildarkvotur fyri tríggjar høvuðsleiðir.

Eitt skifti fyrst í 1990-unum royndu tvey føroysk skip í Suðuríshavinum eftir patagonskum tannfiski. Og í seinastuni hevur Fiskimálaráðið havt onkran fyrispurning um møguleikarnar hjá føroyskum skipum at fiska tannfisk í CCAMLR-økinum.

Støða Fiskimálaráðsins er samsvarandi altjóða leikreglum, at skulu føroysk skip fiska har, er fyrsta treytin, at føroyskir myndugleikar samstarva um umsiting av fiskastovnunum, antin formliga við at gerast partur av CCAMLR ella í minsta lagi fylgja reglunum, sum CCAMLR setir, samsvarandi skyldum okkara sum flaggland.

Viðvíkjandi limaskapi í CCAMLR er sáttmálin opin fyri øllum tjóðum, sum hava áhuga í gransking ella veiðu í samband við livandi tilfeingi, sum er umfatað av sáttmálanum.

### *6.3.3 SPRFMO*

SPRFMO er undir stovnan, og Føroyar hava verið við á einum fundi. Ætlanin við nýggja felagsskapinum er at skipa fiskiskapin í altjóða sjógvi eftir uppisjóvar fiskastovnum m.a. rossamakreli, umframt djúphavsfiskasløgum sum búrfiski og tannfiski. Nýggi felagsskapurin fevnir um flestu leiðirnar í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum, frá vesturstrondini á Suðuramerika til havleiðirnar millum Australia og Ný Sæland og sunnanfyri Australia.

Lond, sum vóru við á fundinum, vóru Australia, Canada, Chile, Kina, Kolombia, Cook Islands, Ecuador, EF, Føroyar, Frakland (vegna Ný Caledonia, Franskt Polenesia og Walles and Fortuna), Japan, Korea, Mikronesia, Ný Sæland, Niue, Palau, Papua Ný Guinea, Peru, Russland, Tapei, Vanuatu, USA, og Ukraina.

Størsti áhugi hjá Føroyum á hesum fundinum, var regulering av fiskiskapinum eftir pelagiskum fiskasløgum - rossamakreli – í altjóða sjógvi útfyri Chile. Londini bundu seg til at avmarka royndina eftir uppsjóvarfiski, so hon í 2008 og 2009 ikki fer upp um tað, hon var í 2007.

Londini skulu boða fyribils skrivstovuni í New Zealandi frá, hvussu nógv royndin var í 2007. Fyri Føroyar merkir semjan, at vit ikki kunnu økja um royndina eftir rossamakreli í brutto tonnasju í 2008 og 2009 meira, enn hon var í 2007. Tvs. at

skip undir føroyskum flaggi, sum hava fiskað í økinum í 2007, kunnu fiska undir somu treytum í 2008 og 2009.

Semja er um at avmarka royndina og veiðina í botnfiskiskapinum til tað, hon var í miðal um árið í tíðarskeiðinum 2002 til 2006.

Fyribilssemjan um botnfiskiskapin ávirkar ikki føroysk skip, tí tey hava ikki roynt eftir botnfiski í økinum. Hesi tiltøkini verða galdandi til ein endaligur sáttmáli er gjørdur, og møguliga onnur tiltøk verða samtykt sambært honum í framtíðini.

Føroyar lúka treytirnar fyri at vera sáttmálapartur[3], tí Føroyar hava verið við til samráðingar.

### *6.3.4 SIOFA*

Eitt annað sáttmálaøki, sum liggur upp at SEAFO og CCAMLR, er SIOFA. Hesin sáttmáli er ikki formliga komin í gildi enn. Samráðingarnar um sáttmálan endaðu í fjør summar, og sáttmálin liggur frammi til undirskrivingar fram til 6. juli 2007 fyri lond, sum tóku lut í samráðingunum og strandalondum í økinum. Eftir hetta er sáttmálin opin fyri øllum, sum eru áhugað í fiskiskapi í økinum.

Londini, sum hava tikið lut í samráðingunum eru Australia, Comoros, EF, Frakland, Japan, Kenya, Madagaskar, Mozambique, Namibia, New Zealand, Russland, Seychellurnar og Yemen. Cook Islands hevur verið við sum eygleiðari.

Endamálið við SIOFA sáttmálanum er at tryggja langtíðar varðveiting og burðardygga gagnnýtslu av fiskasløgum (øðrum enn tunfiski) á leiðum uttanfyri løgdømi strandalanda.

Enn er felagsskapurin, sum sáttmálin stovnar, ikki farin til verka, og ongar reguleringar eru settar í verk.

[3] T.v.s sum The Kingdom of Denmark in respect of the Faroe Islands

# 7. Keldur

Chatham House March 2007. Improving Fisheries Governance by Strengthening Regional Fisheries Management Organizations.

Fiskimálaráðið. Samráðingarupplegg

Fiskimálaráðið. Arbeiðsskjøl frá limum í nevndini.

Fiskimálaráðið. Talvur yvir kvotur og fiskidagar

FAO. General situation of world fish stocks. www.fao.org

FAO. Strengthening regional fisheries management organizations. 2007

FAO. Code of Conduct for Responsible Fisheries. 1995

FAO. Agreement to promote compliance with international conservation and management measures by fishing vessels on the high seas

Hans Jacob Kollslíð. Altjóða fiskivinnuavtalur og føroysk fiskivinnustýring. 2005

High Seas Task force (2006). Closing the net: Stopping illegal fishing on the high seas. Governments of Australia, Canada, Chile, Namibia, New Zealand, and the UK, WWF, IUCN and the Earth Institute at Columbia University.

Norman, Victor D. Næringsstruktur og Utenrikshandel – i en liten påbe økonomi, 1993, Universitetsforlaget Oslo, 1993.

Porter, Michael E. The Competitive Advantage of Nations. 1990. Publisher: The Macmillan Press Ltd, London and Basingstoke.

Thomsen, B. 2001. The impact of oil and gas developments on the employment situation of Faroese Navigators and Maritime Engineers. Robert Godon University, Aberdeen, UK

Samrøður:

Thor P/F, Hósvík. Per Gullklett, Gunnbjørn Joensen, Jógvan Martin Ferjá

JFK Trol P/F, Klaksvík, Hanus Hansen, Jákup Sólstein

Christian í Grótinum P/F, Klaksvík, Christian Martin Rasmussen

Framherji SP/F, Toftir, Annfinn Olsen

Ísbjørnin SP/F, Tórshavn., Bjarti Mohr

Havborg P/F, Leirvík, Tummas Justinussen.

# Fylgiskjøl

## 8. Fylgiskjal 1. Altjóða spælireglur

Rætturin at veiða fisk er býttur í sjóøki innanfyri 200 fjórðingar og altjóða sjógv. Innanfyri 200 fjórðingar hevur strandalandið allan ræðisrættin og kann í sín-ámillum sáttmálum ella við sølu av kvotum loyva øðrum at veiða.

Í altjóða sjógvi er sum høvuðsregla fríur fiskiskapur. Tó eru mong av hesum økjum skipað við millumlandafelagsskapum so sum NAFO og NEAFC, og fyri ferðandi fiskastovnar er veiðan skipað við strandalandasáttmálum, sum vit kenna viðvíkjandi sild, makreli og svartkjafti.

Tó er enn altjóða sjógvur, har eingin regulering er, og har frítt er at veiða. Væntandi er, at allur altjóða sjógvur við tíðini verður reguleraður – eins og dømi er um í Suðurkyrrahavinum.

Heimsins veiðusøga sigur frá, at trároynd gjørdi, at fleiri stórir fiskastovnar vóru nærum avoyddir. Hendan gongdin bar í sær, at heimssamfelagið gjørdist alsamt meira tilvitað um, at okkurt munagott mátti gerast til tess at minka um ovnýtsluna av tilfeinginum í havinum.

Mest umfatandi nýskapanin viðvíkjandi stýring av gagnnýtsluni av tilfeinginum í havinum, fór fram í seinnu helvt av farnu øld. Flestu tjóðir settu tá á stovn serbúskaparøki, sum merkti, at sjómarkið kundi flytast út á 200 fjórðingar.

Innan fyri teirra egna serbúskaparøkið hava strandarlond rætt til at rannsaka, troyta, varðveita og umsita náttúrutilfeingið - bæði livandi og ikki livandi. Strandarlond hava eisini rætt at áseta mest loyvdu veiðu grundað á tey bestu vísindaligu prógvini, sum til taks eru. Hetta tryggjar strandalondunum ein løgligan rætt til at umsita alt fiskarí í teirra øki og grundfestir samstundis eisini teir løgligu karmarnar, sum tey kunnu nýta til tess at avmarka atgongdina til teirra tilfeingi.

Grundleggjandi avtalan um umsiting av havumhvørvinum er Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða, sum er týdningarmesti karmurin fyri menningini av einari meira nøktandi umsitingarligari skipan av havinum.

ST Havrættarsáttmálin ásetir sum høvuðsreglu frían fiskiskap í altjóða sjógvi. Fríi fiskiskapurin er tó ikki uttan avmarkingar. Sáttmálin ásetir eina almenna skyldu fyri øll lond at seta í verk neyðug tiltøk fyri at varðveita livandi tilfeingi í altjóða sjógvi. Tiltøkini skulu byggja á bestu vísindaligu upplýsingarnar, og skulu nýtast til at varðveita ella byggja uppaftur stovnar til eitt støði, sum gevur best møguliga burðardygga troyting í framtíðini.

Serligar skyldur til at samstarva um at seta tiltøk í verk áliggja teimum londum, sum troyta eins livandi tilfeingi ella ymisk livandi tilfeingi í sama øki. Londini skulu eisini tryggja, at varðveitingartiltøkini og umsitingin av teimum hvørki formliga ella reelt føra við sær mismun fyri fiskimenn í nøkrum londum.

Havrættarsáttmálin fevnir um so at siga alt, íð hevur við havið at gera, frá marknaðáseting og sáttargerð í ósemjum millum tjóðir til umhvørvisstýring, vísindaliga gransking, tøkni, fiskiskap og annað búskaparligt og handilsligt virksemi.

Fyrst í 90'árunum samdust meirilutin av heimsins tjóðum um, at tær yvirskipaðu greiningarnar í Havrættarsáttmálanum, sum áseta, at tjóðir skulu samstarva um varðveitsluna og umsitingina av tilfeinginum í altjóða sjógvi, máttu strammast upp. Hetta førdi í 1995 til semjuna um at seta í verk ásetingarnar um varðveitsluna og umsitingina av ferðandi fiskastovnum. Hendan semjan verður vanliga rópt ST-fiskastovnaavtalan.

Í fyrra lagi hava allar tjóðir eina skyldu til at tryggja, at teirra ríkisborgarar fylgja teimum ásetingunum, sum eru gjørdar til tess at varðveita fiskastovnarnar í altjóða sjógvi. Og í øðrum lagi hava allar tjóðir løgdømi yvir fiskiførum, sum sigla undir

teirra flaggi, í altjóða sjógvi. Semjan ásetir eisini leiðreglur fyri stovnsetan av millumlandafelagsskapum til umsiting av vinnuligum fiskiskapi í altjóða sjógvi.

Roknast skal við, at regionalir fiskiveiðufelagskapir sum frá líður fáa ein størri og størri leiklut í at skipa fiskiskapin í altjóða sjógvi.

Atburðarreglugerðin hjá FAO um fiskiskap við ábyrgd frá 1995[4] ásetir, hvørja ábyrgd flaggtjóðin hevur av virkseminum hjá fiskiførum, íð sigla undir hennara flaggi. Reglugerðin miðjar eftir, at tjóðir gjøgnumføra ábyrgdarfullar fiskivinnustýringsskipanir, bæði í teirra egna serbúskaparøki og í sínámillum avtalum, soleiðis at gagnnýtslan av tilfeinginum í havinum kann gerast so burðardygg sum gjørlig.

## 8.1 Skyldur hjá flagglandinum

Sambært lóg um vinnuligan fiskiskap kunnu fiskifør undir føroyskum flaggi ikki fara til vinnuligan fiskiskap uttan at hava veiðiloyvi og fiskiloyvi frá føroyskum myndugleikum. Hetta er eisini galdandi fyri fiskiskap í altjóða sjógvi.

Sambært fiskastovnaavtaluni, sum Føroyar hava bundið seg til, hava flagglond skyldu til at ansa eftir, at tess skip virða varðveitingar- og umsitingartiltøk fyri ávís øki, og at ansa eftir, at hesi skip ikki fáast við virksemi, sum máar støðið undan tí ávirkan, sum tiltøkini hava.

Loyvi, sum verða givin til at fiska í altjóða sjógvi, skulu vera í tráð við reguleringar, sum eru gjørdar fyri ávís øki ella globalt, og flagglandið skal bert loyva fiskiskapi í altjóða sjógvi, um tað er ført fyri at tryggja, at skipið heldur altjóða reglur, landið hevur bundið seg til.

[4] Code of Conduct for Responsible Fisheries

## 8.2 ST samtykt frá 2006 viðvíkjandi botnfiskiskapi

ST hevur í 2006 samtykt at heita á lond um at seta í verk tiltøk viðvíkjandi botnfiskiskapi í altjóða sjógvi, eisini í økjum har ongar regionalar reguleringar eru.

Fyri at verja um umhvørvið á djúpum havi og tað lívfrøðiliga fjølbroytni tað hýsur, heitir ST á lond um beinanvegin at taka stig til burðardygga umsiting av fiskastovnunum og at verja viðbreknar vistskipanir í sjónum móti oyðileggjandi fiskiskapi.

ST heitir á flagglond skjótast gjørligt, og seinast 31. desember 2007, antin at seta í verk serligar reguleringar ella at nokta botnfiskiskapi í altjóða sjógvi, har ongar reguleringar eru.

Reguleringar, sum verða settar í verk, skulu gerast í tráð við fyrivarnis- og umhvørvis meginreglurnar.

Metast skal, grundað á best atkomiligu vísindaligu upplýsingar, um botnfiskiskapur hevur eyðkend skaðilig árin á viðbrekin havumhvørvi, og um so skuldi verið skal tryggjast, at tað er møguligt at forða slíkum árini. Er hetta ikki møguligt, skal økið, har viðbrekin havumhvørvi eru, steingjast fyri botnfiskiskapi.

Londini skulu eyðmerkja viðbrekin havumhvørvi og avgera, um botnfiskiskapur førur til eyðkend skaðilig árin á slík havumhvørvi og langtíðar varðveitingina av djúphavsfiskastovnum, eitt nú við at betra vísindaliga gransking og savna saman og deila upplýsingar og við rannsóknarfiskiskapi.

ST heitir eisini á londini um at almannakunngera listar yvir skip við egnum flaggi, sum hava loyvi til botnfiskiskap í altjóða sjógvi, og at almannakunngera tiltøk, tey hava sett í verk.

## 8.3 Skyldur hjá flagglondum sambært fiskastovnaavtaluni

Sambært Fiskastovnaavtaluni skal flagglandið skráseta øll skip, sum hava fingið loyvi at fiska í altjóða sjógvi og skal loyva londum, sum hava beinleiðis áhuga í hesum upplýsingum atgongd til skrásetingarnar.

Flagglandið skal seta treytir um skráseting og fráboðan um, hvar skipini eru, um veiðuna og aðrar viðkomandi upplýsingar. Eisini skal flagglandið seta treytir um sannan av veiðu, eitt nú skráseting av landingum ella líknandi.

Flagglandið skal eisini regulera umskiping í altjóða sjógvi fyri at tryggja, at støði ikki verður máað undan varðveitingar- og umsitingartiltøkum.

Flagglandið skal seta í verk eftiransingarskipanir, so sum fylgisveinaeftirlit.

Flagglandið skal áseta eftirlitsátøk og gera samstarvsavtalur um eftirlit við onnur lond, herundir seta treytir um, at skipini loyva eftirlitsfólki frá øðrum londum at koma umborð.

Røkir eitt land ikki skyldur sínar, kann annað land taka yvir. Tað er tó greitt, at rættarsókn bert kann fyriganga í flagglandinum, men ásetingar í avtaluni loyva, at skip verður tikið fyri at tryggja prógv um ólógliga veiðu, og eisini at tað kann førast til lands.

Tá mett verður, at brot ímóti ásettum reguleringstiltøkum fer fram, hevur flagglandið skyldu til at kanna skip, sum sigla undir flaggi tess, og er landið sannført um, at fullgóð prógv eru fyri, at brot er farið fram, skal tað beinanvegin lata málið til myndugleikar sínar við tí fyri eyga at fremja rættarsøkn ímóti viðkomandi skipi.

Flagglandið skal ansa eftir, at skip, sum hava verið uppi í einum álvarsligum broti í sambandi við slík tiltøk, ikki fáa loyvi at fara til fiskiskap aftur á víðum havi,

fyrr enn øll revsitiltøk, sum flagglandið áleggur, eru sett í verk. Harumframt skulu londini hava ásetingar, ið heimila, at rættindini til at starvast sum skipari ella yvirmaður á hesum skipum kunnu havnast, ógildast ella takast aftur fyribils.

Eitt land, sum kannar eitt brot, kann biðja onnur lond ella felagsskapir um hjálp til kanningararbeiðið. Um eitt fiskifar, sum veiðir á víðum havi, hevur framt brot innanfyri fiskimark hjá einum øðrum strandalandi, skal flagglandið eftir áheitan frá strandalandinum kanna málið. Undir kanningararbeiðinum skal flagglandið samstarva við strandalandið og kann loyva strandalandinum at kanna fiskifarið á víðum havi. Lond, sum eru partar í regionalum ella smærri felagsskapum, kunnu, til flagglandið sjálvt hevur íverksett hóskandi tiltøk og í tann mun fólkarætturin loyvir hesum, seta tiltøk í verk fyri at forða fyri víðari fiskiskapi hjá fiskifari, sum hevur framt brot ímóti viðtiknum reguleringum innan fyri slíkt samstarv.

Øll limalond í einum regionalum felagsskapi, sum umboðar eitt ávíst øki í altjóða sjógvi, kunnu fara umborð og gera kanningar umborð á skipum frá øllum londum, sum eru við í hesari avtalu uttan mun til, um viðkomandi land eisini er limur í tí regionala felagsskapinum ella ikki. Londini skulu innan regionalu felagsskapirnar ella avtalurnar áseta nærri mannagongdir til tess at kunna handhevja hesa áseting.

Fiskastovnaavtalan ásetir annars út í æsir reglur fyri samspælinum millum handhevjing av flagglandinum og handhevjing av tí landi, sum ger eftirlit og kanningar. Útgangsstøðið er her, at um ikki flagglandið yvirheldur sínar skyldur viðvíkjandi eftirkanning og uppfylging, kann annað land fremja eftirkanning og uppfylging. Endamálið er, at ásetingar undir øllum umstøðum skulu handhevjast.

# 9. Fylgiskjal 2. Verandi veiðumøguleikar

Fyrri partur av arbeiðssetninginum er at lýsa nýggjar veiðumøguleikar uttan fyri føroyskt sjóøki, har føroyingar veiða í dag.

Í hesum parti vera verandi veiðumøguleikarnir lýstir. Verandi veiðumøguleikar eru býttir í sínámillum avtalur, strandalandaavtalur og fiskiveiðufelagsskapir.

## 9.1 Sínámillum avtalur

Føroyar hava sínámillum avtalur við ES, Norra (Svalbard), Russland, Ísland og Grønland. Niðanfyri verða hesar avtalur lýstar hvør sær.

### *9.1.1 ES*

Føroyar og ES hava havt fiskiveiðusamstarv síðani 1977. Meginreglan í samstarvinum er, at ein nøktandi javnvág skal vera í árligu avtaluni um sínámillum fiskirættindi.

Seinastu árini hava Føroyar havt størri fyrimun av fiskiveiðisamstarvinum, við tað at føroyingar í størri mun hava gagnnýtt kvoturnar. Týdningarmestu partarnir í sáttmálanum fyri Føroyar eru svartkjaftur, makrelur og rækjuveiða í Eysturgrønlandi.

Fiskiskapurin eftir ídnaðarfiski var ein týdningarmikil partur av fiskiveiðusamstarvinum millum Føroyar og ES, men sum støðan í ídnaðarfiskastovnunum hevur verið seinastu árini, er hesin fiskiskapurin minkaður burtur í lítið og einki.

Føroyar og ES eru saman við Noreg strandarlond fyri makrel. Umframt at gera eina strandarlandaavtalu gera partarnir hvør sær í teimum sínámillum fiskiveiðuavtalunum umbýti av makrelkvotu og loyva hvørjum øðrum atgongd at fiska av egnari kvotu.

Vanliga fylgja kvotunøgdirnar møguligum broytingum í heildarstrandarlanda-kvotuni. Sambært siðvenju fáa Føroyar atgongd í ES sjógvi at fiska av egnari strandarlandakvotu somu nøgd, sum ES fær í kvotu frá Føroyum.

Føroyar kunnu fiska 30,15% av kvotuni frá ES eystan fyri 4 stig vestur. Tað er eitt standandi ynski frá føroyskari síðu, at hesin parturin verður størri. ES hevur avvíst hesum ynskinum vísandi til, at ES skip eisini bert kunnu flyta 30% av teirra kvotu eystur um 4 stig.

Føroyska sjónarmiðið er, at partarnir geva hvørjum øðrum atgongd til somu leiðir og hava somu reglur um reiðskap. Hetta er t.d. galdandi fyri IIa og IVa og at fáa loyvi til at fiska eystan fyri 12 stig.

Støðan í nebbasildastovninum og við hugburðinum um fiskiskap eftir hvítings-bróðuri í Norðsjónum ber ikki til at halda fram við somu nøgdum.

Hvítingsbróðurin er farin úr avtaluni, meðan møguleikin at fiska nebbasild er knýttur at úrslitunum av kanningum av stovninum grundað á royndarfiskiskap. Um fiskiskapur fer at verða loyvdur, skulu Føroyar og ES kunna gera avtalu um, at føroysk skip kunnu fiska nebbasild, og ES skip fáa hækkað svartkjaftakvotu í føroyskum sjógvi.

Kvotan av brislingi og hjáveiðukvotan av sild er hækkað fyri at halda jávnvágini í avtaluni. ES hevur eisini loyvt fiskiskapi eftir hvítingsbróðir, men ES hevur ikki bjóðað føroyskum skipum henda møguleika.

Føroyingar hava í fleiri ár roynt at fingið tillutað eina sildakvotu frá ES í Norðsjónum, men ES hevur afturvíst hesum, tí Føroyar ongantíð hava havt sildakvotu tillutaða frá ES.

Útlitini fyri fiskiskapi eftir ídnaðarfiski í Norðsjónum eru døpur, men arbeitt kann vera við at fáa eina smidliga skipan, har sildakvoturnar í Skagerak og vestan fyri 4 stig kunnu verða fiskaðar í Norðsjónum.

Føroyar fáa gjøgnum sínámillum fiskiveiðusáttmálan við ES atgongd at fiska rækjur, lodnu, svartkalva og kongafisk í grønlendskum sjógvi. Lodnustovnurin er sera illa fyri, so strandarlondini hava avtalað, at onki verður fiskað.

### *9.1.2 Norra*

Føroyar og Noreg hava havt sínámillum fiskiveiðuavtalu síðani fiskimarkini vóru flutt út á 200 fjórðingar. Umframt at fevna um rækjufiskiskap við Svalbard gevur avtalan við Noreg flakatrolarum, nótaskipum og ídnaðartrolarum atgongd at fiska í norskum sjógvi.

Føroyar og Noreg eru harafturat samd eina serliga avtalu um svartkjaftafiskiskap og eina serliga avtalu um makrelfiskiskap. Hesar geva pørtunum atgongd at fiska ávísar partar av strandarlandakvotunum á leiðunum hjá hvørjum øðrum.

Nótaskipini fáa lut í makrelkvotu frá Noreg, umframt at teimum eftir serligari avtalu verður givin atgongd at fiska ein stóran part av føroysku makrelkvotuni í norskum sjógvi.

Hjá flakatrolararunum er botnfiskakvotan í norska partinum av Barentshavinum eitt neyðugt íkast til teirra rakstrargrundarlag. Yvirføring av botnfiskakvotum, sum Føroyar fáa í sínámillum fiskiveiðuavtaluni við Russland, er ein týðandi partur av avtaluni við Noreg.

Noreg og Russland áseta á hvørjum ári sínámillum, hvussu stór heildartoskakvotan í Barentshavinum skal verða. Henda kvotan verður býtt millum

londini, og ásett verður eisini, hvussu nógv hvørt landið hevur at lata triðjalondum.

Undir samráðingunum við Noreg hava Føroyar lagt stóran dent á, at lækkingin av toski ikki verður so stór sum lækkingin í heildarkvotuni í Barentshavinum, og at Føroyum varð veittur fastur partur av mest loyvdu veiðuni (MLV), sum samsvarar við tað søguliga veiðimynstrið í Barentshavinum.

Ídnaðarskipini hava vanliga fingið kvotur í norska partinum av Norðsjónum, sum saman við líknandi kvotum frá ES í Norðsjónum hava verið veiðugrundarlagið hjá hesum skipum.

Noreg og ES samdust at avmarka fiskiskapin eftir hvítingsbróðuri og nebbasild so nógv sum møguligt í Norðsjónum. Tí er eingin kvota av hvítingsbróðuri í norskum sjógvi. Ístaðin var semja um, at føroysk skip kundu fiska svartkjaft í Norðsjónum, men lítið er veitt av ídnaðarfiski íroknað svartkjafti í Norðsjónum.

Kvoturnar í Norðsjónum fevna um ídnaðarfiskakvotur og makrel umframt nakað av sild, rossamakreli og upsa. Tað hevur verið striltið hjá ídnaðarskipunum at gagnnýta sínar veiðumøguleikar. Hjáveiðan av sild og makreli er so stór, at tey ikki kunnu halda seg innan fyri galdandi hjáveiðureglur.

Fiskimálaráðið hevur tí seinastu árini latið ídnaðarskipunum alla sildakvotuna í Norðsjónum at verða brúkt sum hjáveiða.

Tað er lítið sannlíkt, at møguleiki verður at fáa kvotu aftur av hvítingsbróðuri og nebbasild, og tí eru ídnaðarskipini bundin at teimum møguleikum, sum tey hava í Norðsjónum.

### *9.1.3 Svalbard*

Noreg hevur yvirvaldsrættin (suverenitetin) yvir Svalbard. Hetta er staðfest í § 1 í Svalbardsáttmálanum frá 1920, sum Danmark (herundir Føroyar og Grønland) hevur undirskrivað og staðfest. Sáttmálin fekk gildi í 1925. Nú eru 39 lond, sum hava staðfest sáttmálan, seinast Ísland í 1994. Sáttmálin fevnir um oyggjabólkin Svalbard og 4 fjórðingar sjóumveldið kring oyggjarnar.

Noreg hevur rætt til at umsita djóra- og plantutilfeingið í Svalbardøkinum, men hetta skal gerast á ein hátt, sum hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis ger mismun millum sáttmálapartarnar. Í greinunum 2, 3 og 7 eru ásetingar um ikki-diskriminering. Varðveitingartiltøk, sum verða ásett, skulu nýtast líka yvirfyri øllum pørtum.

Í 1977 hevur Noreg upprættað eitt fiskivarðveitingarøki uppá 200 fjórðingar við Svalbard. Í hesum øki kunnu reglur um fiskiskap ásetast. Ymsar tulkingar hava verið frammi um, at í 1920, tá Svalbardsáttmálin varð gjørdur, vóru heilt onnur viðurskifti galdandi viðvíkjandi sjómarki. Í 1920 høvdu flestu lond bara 3 (ella 4) fj. sjóumveldi og ikki víðari fiskimark.

Síðan 1977 hava flestu lond víðkað fiskimarkið út á 200 fj. og sjóumveldið út á 12 fj., og Noreg hevur eisini í 2004 víðkað sjóumveldið við Svalbard út á 12 fj. Hóast Svalbardsáttmálin ikki hevur ásetingar um hesi fiskimørk, hevur yvirvaldsrætturin hjá Noreg higartil í praksis verið virdur innan fyri 200 fj. fiskivarðveitingarøkið.

Føroyar hava síðan 1977 havt sínámillum fiskiveiðuavtalu við Noreg, og tá varð eisini ásett hámarksveiða av toski og øðrum (kongafiskur, svartkalvi) í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard fyri føroysk skip. Føroyska lodnuveiðan í Svalbardzonuni er síðan 1977 farin burturav føroysku kvotuni í norska búskaparliga økinum.

Síðan 1977 hevur føroyska toskakvotan við Svalbard verið ein ávísur prosent-partur av MLV í Barentshavinum, og innanfyri 3. landskvotuna, sum Noreg og Russland hava avtalað fyri Svalbard. Føroyski prosent-parturin hækkaði í 1996, eftir at Føroyar høvdu lagt fram nýggj veiðitøl fyri økið í einum umboðandi søguligum tíðarskeiði, áðrenn fiskivarðveitingarøkið við Svalbard varð stovnsett.

Í avtaluni fyri 1983 varð føroyska rækjuveiðan við Svalbard avmarkað við hámarki á veiðiorkuni, og var hetta krav frá Noreg fyri at gera fiskiveiðisáttmála. Í 1998 varð hetta broytt, tí Noreg hevði samtykt reglur í mai 1997, sum avmarkaðu rækjuveiðina við Svalbard við fiskidøgum. Hesum mótmælti føroyskir myndugleikar, við tað at samráðingar ikki høvdu verið um málið, og at søguliga tíðarskeiðið, sum var grundarlagið fyri ásetingini av fiskidøgum, ikki var umboðandi fyri føroyska rækjuveiði við Svalbard. Føroyska rækjuveiðan er tó ikki stór við Svalbard, og enn eru føroyingar ikki komnir upp móti markinum fyri tal av fiskidøgum.

Í 2004 ásetti Noreg reglur um avmarking í veiðini eftir norðhavssild við Svalbard. Føroyar mótmæltu hesum í eini verbalnotu dagfest 21. september 2004 frá danska Uttanríkismálaráðnum til norskar myndugleikar. Víst verður á, at hetta tiltak verður mett at vera diskriminerandi móti føroyingum, og í stríð við Svalbardsáttmálan um líka atgongd.

Ísland hevur síðan 2004 havt altjóða útlendskar serfrøðingar at fyrireika rætttarmál móti Noreg við Altjóða dómstólin í Haag (International Court of Justice). Íslendska uppáhaldið er, at Noreg ikki í fiskivarðveitingarøkinum hevur rætt at áseta avmarkingar, sum ikki geva øllum pørtum somu atgongd, sum t.d. varð gjørt í samband við avmarkingar í veiðini eftir Norðhavssild í Svalbardsonuni.

Í 2006 kunngjørdi Noreg ætlanir um at seta á stovn 200 fj. búskaparøki kring Svalbard í staðin fyri verandi fiskivarðveitingarøki. Við hesum fær Noreg

suverenan rætt yvir tilfeinginum í økinum. Stórabretland hevur sent skriv til norska uttanríkismálaráðið, har víst verður á, at teir ikki eru samdir í norsku tulkingini av rættarstøðuni uttanfyri sjóumveldið við Svalbard.

Í februar 2007 sendi Fiskimálaráðið norskum myndugleikum eina umsókn um loyvi til føroyskt skip at royndarveiða eftir svartkalva við Svalbard. Henda umsókn er ikki avgreidd enn. Føroyska sjónarmiðið er, at vit hava rætt til at fara undir hesa veiði á jøvnum føti við norðmenn.

### *9.1.4 Russland*

Fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Russland er bygt á rammusáttmála frá 1977. Føroyar hava loyvt russiskum skipum at fiska stórar nøgdir av svartkjafti og av makreli í føroyskum sjógvi aftur fyri veiðumøguleikarnar eftir botnfiski í Barentshavinum.

Russiski fiskiskapurin eftir svartkjafti og makreli í føroyskum sjógvi varð saman við tí føroyska og íslendska brúktur sum ein partur av grundarlagnum hjá Føroyum at styðja undir krav Føroya í strandarlandasamráðingunum um svartkjaftin og makrelin. Makrelurin kom undir avmarkingar í 2000 og svartkjafturin í 2006.

Føroyski áhugin fyri fiskiveiðumøguleikum í Barentshvinum er serliga toskur. Umframt tosk hava vit havt kvotur av hýsu, rækjum og flatfiski. Flatfiskur og rækjur fóru úr avtaluni fyri einari tíð síðani, men ein lítil nøgd av rækjum er komin upp í aftur og 1.000 tons av flatfiski eru komin inn aftur í avtaluna.

Lodna hevur verið partur av avtalunum, tá lodnufiskiskapur hevur verið loyvdur í Barentshavinum. Síðani 2004 hava Noreg og Russland avgjørt ikki at loyva lodnufiskiskapi, tí gýtingarstovnurin hevur verið mettur at vera so illa fyri.

Føroyska botnfiskakvotan í russiskum sjógvi hevur ligið báðumegin 10.000 tons seinastu árini. Í 2002 og 2004 vórðu ískoytisavtalur gjørdar seinni á árinum, so kvotan bleiv nakað størri. Aftur fyri fekk Russland meiri svartkjaft í føroyskum sjógvi. Sum heild kann sigast, at føroyska botnfiskakvotan altíð hevur verið fiskað, men at veiðumøguleikarnir eftir flatfiski og rækjum ikki hava verið gagnnýttir.

Russland fær í toskavirði nógv meiri tillutað í føroyskum sjógvi, enn hvat Føroyar fáa tillutað í russiskum sjogvi. Grundin til hetta er, at Russland setti sum ófrávíkiligt krav, at allur pappírsfiskur skuldi úr avtaluni. Tí fóru flatfiskur og rækjur út, men hóast tað fekk Russland bert eitt vet minni av svartkjafti og makreli í føroyskum sjógvi, samstundis sum føroysku botnfiskakvoturnar og lodnukvotan vórðu lutfalsliga nógv skerdar.

Her skal tó verða havt í huganum, at føroysk skip kunnu hava hjáveiðu av øðrum botnfiski enn toski og hýsu samsvarandi reglum galdandi í russiskum sjógvi. Hesin møguleikin fyri hjáveiðu broytir javnvágina nakað til føroyskan fyrimun. Føroysk skip hava fiskað upp í um 500 tons av øðrum botnfiski – mest upsa.

Umrokningarvirðið á svartkjafti er lækkað og tí fór russiska svartkjaftakvotan so nógv upp, at russisk skip ikki megna at veiða alla kvotuna.

Er grundarlag fyri at broyta skipanina við umrokningarfaktorum av toski í Barentshavinum, so hvørt skipið fær sínar egnu faktorar, kann tað vera við til, at skipini kunnu leggja seg eftir at fáa størri úrtøku. Við verandi fastløgdu faktorum er eingin eggjan til menning í framleiðslutøkni, tí roknaða veiðan verður gjørd upp eftir nøgdini av lidnari vøru umborð. Við størri úrtøku fæst meiri liðugvøra burtur úr færri tonsum í rundari vekt. Men er úrtøkuprosentið størri, verður roknaða veiðan í rundari vekt størri.

Á hvørjum ári verður avtalað, at Føroyar og Russland skulu samstarva í vísindaligum rannsóknum viðvíkjandi fiskiskapi. Fiskirannsóknarstovan og PINRO í Murmansk hava gjørt eitt uppskot til framhaldandi samstarv. Møguleiki kann vera fyri at breiðka samstarvið at umfata øll heimshøv og á tann hátt fáa vitan til vega, sum føroyingar kunnu gagnnýta. At russar liggja inni við stórari vitan er fer aftaná ferð staðfest. Týdningarmikið er, at føroyingar fáa atgongd til ríku fiskiveiðuvitanina hjá russum.

Vinnuligt samstarv er umrøtt í rammusáttmálanum og í verandi fiskiveiðuavtalu. Arbeitt hevur verið við at gera ein handilssáttmála millum Føroyar og Russland, men enn er hann ikki undirskrivaður.

Innan fyri karmarnar av fiskiveiðuavtaluni verður eisini avtalað, at møguleiki kann verða fyri, at føroysk reiðarí keypa kvotur frá russiskum reiðaríum ella frá russiskum myndugleikum. Øll slík mál skulu fara um myndugleika hendur. Seinastu árini hevur ikki verið nógv av slíkum samstarvið. Føroysk reiðarí hava roynt at fingið møguleika at keypa botnfiskakvotuna, sum Ísland kann keypa í Barentshavinum, men vanliga kortini ikki ger. Í seinastuni hevur Russland bjóða Føroyum hendan møguleika. Hetta hevur verið roynt við misjøvnum úrsliti.

### *9.1.5 Ísland*

Í árligu fiskiveiðiavtalunum millum Ísland og Føroyar hevur ikki verið talan um javnvág í sínamillum fiskimøguleikum. Føroyingar hava vanliga havt størri rættindi í íslendskum sjógvi, enn íslendingar í føroyskum sjógvi. Seinastu árini er lutfallið kortini broytt, serliga tí, at íslendsk skip í størri mun eru farin at fiska svartkjaft og sild í føroyskum sjógvi.

Seinnu árini hevur verið ein serlig semja um uppsjóvarfiskasløg. Eftir hesum kunnu íslendsk skip veiða svartkjaft, heystgýtandi sild og makrel í føroyskum sjógvi, meðan føroysk skip kunnu veiða svartkjaft og lodnu í íslendskum sjógvi.

Umframt hetta kunnu føroysk skip veiða ta grønlendsku kvotuna uppá 10.000 tons av lodnu í íslendskum sjógvi.

Fiskiskapurin eftir svartkjafti inni hjá hvørjum øðrum hevur ikki verið reguleraður við kvotum. Í avtaluni er tó tilskilað, at partarnir kunnu áseta mest loyvda tal av skipum, sum veiða á svartkjaftaleiðini samstundis. Royndirnar seinastu árini eru, at íslendsk skip fiska nógvan svartkjaft í føroyskum sjógvi, meðan føroysk fiska nógv minni í íslendskum sjógvi.

Føroyar og Ísland hava, síðani fiskiskapurin eftir norðhavssild tók seg upp aftur, verið samd um at loyva skipum frá báðum londum at fiska egna kvotu inni hjá hinum partinum.

Greitt er, at tann avmarkaða toskakvotan á 1.200 tons hevur gjørt tað torført hjá føroyskum skipum at gagnnýta botnfiskakvotuna fult út. Hetta kemur mest av, at tað ikki loysir seg at fiska upsa við snellu. Hjáveiðan av toski er ov stór til at røkka til at kunna fiska alla botnfiskakvotuna.

Føroysk rækjuskip hava sett fram ynski um at kunna gera royndir íslendsku megin markið ímóti Eysturgrønlandi á Dohrnbankanum. Føroysku skipini eru ofta tarnað av ísi í grønlendskum sjógvi, men tað kann vera roynandi íslendsku megin markið. Sjálvir hava íslendingar ikki longur rækjuskip, sum kunnu fiska í ísi. Føroysku skipini hava tí ført fram, at um tey kundu roynt har, gera tey samstundis royndir í íslendskum sjógvi.

### *9.1.6 Grønland*

Týdningarmestu partarnir í samstarvinum millum Føroyar og Grønland hava verið kongafiskur í Irmingarhavinum, royndarveiða eftir toski í Eysturgrønlandi við hjáveiðu av svartkalva, rækjuveiða á 3L og norðhavssild.

Avtalan við Grønland gevur møguleika til at býta fiskidagar eftir rækjum á Flemish Cap. Eisini gevur hon føroyskum skipum møguleika fyri at keypa lodnukvotu í Eysturgrønlandi, um kvota er eftir at fiska. Eisini kunnu føroysk skip fiska 50% av lodnukvotuni frá íslendingum í grønlendskum sjógvi.

Frá fyrsta degi av hevur royndarveiða verið ein týðandi partur av fiskiveiðu-samstarvinum millum Føroyar og Grønland. Føroyar hava havt loyvi at hava royndarfiskiskap eftir svartkalva í Vesturgrønlandi norðan fyri 68 stig avmarkað til 125 tons, sum nú er kvota.

Seinni varð givið føroyskum skipum atgongd at royndarfiska eftir toski, brosmu og steinbíti í Eysturgrønlandi í 100 dagar. Mestloyvdað veiðan er 400 tons av toski við í mesta lagi 225 tonsum av svartkalva og kalva sum hjáveiðu.

Kongafiskurin í Irmingarhavinum verður viðgjørdur í strandarlandasamráðing-unum millum Føroyar, Ísland og Grønland og er tí ikki ein partur av avtalu millum Føroyar og Grønland.

Ein møguleiki, sum føroyska samráðingarnevndin kann royna, er, at royndarveiða í Eysturgrønlandi kann verða skipað á tann hátt, at Føroyar hava eina serstaka kvotu fyri tosk og eina serstaka kvotu av svartkalva/kalva. Í báðum førunum skal verða loyvt at hava hóskandi nøgd av kongafiski sum hjáveiðu.

Ein annar møguleiki er at fáa eina toskakvotu í Vesturgrønlandi umframt verandi royndarkvotu í Eysturgrønlandi.

Hildið skal vera fram við, at føroysk skip kunnu royndarfiska eftir rækjum uttan um higartil ásettar kvotur eftir rækjum norðan fyri $67^{o}$ í Eysturgrønlandi.

Vinnan hevur skotið upp, at føroysk skip kunnu fara undir royndarveiðu eftir lodnu í Vesturgrønlandi.

Føroyar og Grønland samdust fyri nøkrum árum síðani at mæla til økt vinnuligt samstarv millum vinnufyritøkur í Føroyum og í Grønlandi. Ítøkilig úrslit av hesum hava verið, at føroysk skip fyri nøkrum árum síðani kundu fiska rækjur, sum vóru tillutaðar grønlendskum reiðaríum, í bæði Vestur- og Eysturgrønlandi.

Myndugleikarnir í Grønlandi hava tó noktað at játta framhaldandi samstarvi á sama grundarlagi sum frammanundan. Politiska sjónarmiðið í Grønlandi er, at tað er ógrundað at lata so nógv út av kvotum, at reiðaríni ikki megna at fiska tær.

## 9.2 Strandalandaavtalur

Føroyar luttaka sjálvstøðugt sum strandarland og avtalupartur í teimum millumlanda skipanunum, ið eru gjørdar fyri umsiting av ferðandi fiskastovnum í landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum.

Strandalandaavtalur eru gjørdar fyri sild, makrel og svartkjaft. Hesar avtalur verða hvør sær viðgjørdar niðanfyri. Eingin strandarlandaavtala er enn gjørd fyri kongafisk í Irmingarhavinum, men samráðingargongdin verður lýst niðanfyri.

### *9.2.1 Sild*

Eftir tríggjar samráðingarfundir í desember 2006 og januar 2007 um umsiting av norðhavssild varð ein avtala fyri 2007 undirskrivað. Við hesum kom fiskiskapurin eftir norðhavssild aftur undir skipaði viðurskifti eftir 4 ár uttan eina formliga skipan.

Samráðingarnevndirnar hjá ymsu londunum vóru samdar um eitt sínámillum býti grundað á eina heildarkvotu í 2007 upp á 1,28 mió. tons. Av hesum eiga Føroyar tilsamans 66.048 tons (5,16%). Harafturat er semja um ein langtíðar veiðisetning fyri sildastovnin. Tvílanda avtalur um sínámillum atgongd at fiska av egnari kvotu í økjunum hjá øðrum pørtum eru eisini tengdar at avtaluni. Í avtaluni millum

Føroyar og Noreg hesum viðvíkjandi fáa Føroyar atgongd at fiska 39.000 tons í norskum sjóøki (íroknað Jan Mayen). Av hesum kunnu 29.000 tons fiskast í norska búskaparøkinum norðan fyri 62°N.

Fundarsemjan er í høvuðsheitum formliga tilmælið til avvarðandi myndugleikar hjá avtalupørtunum. Samanborið við fyrrverandi avtalur, er fylgjandi orðingin í grein 2 tó komin afturat. ”Sendinevndirnar boðaðu frá ætlanini um at royna at varðveita lutfallið í býtinum partanna millum komandi árini.” Endamálið við hesari orðing er at leggja dent á týdningin av, at tað ikki verður latið upp fyri nýggjum samráðingum um býtið á hvørjum ári, hóast avtalan bert er galdandi fyri 2007. Býtið, eisini umroknað til prosentpartar, sæst í talvuni niðanfyri.

| Lond | Nøgd | % |
|---|---:|---:|
| Føroyar | 66.048 | 5,16 |
| ES | 83.328 | 6,51 |
| Ísland | 185.728 | 14,51 |
| Noreg | 780.800 | 61,00 |
| Russland | 164.096 | 12,82 |

Í 1996 samdust Føroyar, ES, Ísland, Noreg og Russland um eina fimmparta avtalu sum felags grundarlag fyri umsiting av fiskiskapi eftir norðhavssild í 1997, við tilhoyrandi sínámillum avtalum um atgongd og flytingar og við støði í heildarkvotum, grundaðar á ráðgeving frá ICES. Avtalan varð endurnýggjað við somu treytum á hvørjum ári fram til 2002.

Undir samráðingunum í 2002 fyri umsiting av norðhavssild í 2003 setti Noreg fram krav um at fáa munandi meira enn tey 57%, sum hevði verið norski parturin síðani 1996, vísandi á, at nógv tann størsti parturin av sildastovninum er í norskum sjógvi. At byrja við var norska kravið 70%, og síðani stóð Noreg í trý ár fast við eitt krav um 65% av heildarkvotuni.

Úrslitið av hesari støðu varð, at eingin fimmparta avtala varð gjørd eftir 2002, hóast samráðingarfundir vóru á hvørjum ári. Gamla avtalan varð kortini nýtt sum grundarlag at gera eina sínámillum avtalu við Noreg fyri 2003. Henda bar í sær, at Føroyar fingu víðkaða atgongd í norskum øki afturfyri at lata Noregi eitt ávíst eyka tonsatal.

Eingin avtala um norðhavssild hevur verið millum Føroyar og Noreg síðan. Í 2003 og 2004 hildu londini seg til sínar upprunaligu partar í gamla býtinum, tá ið tey settu sær egna kvotu við støði í tilmælum hjá ICES um heildarkvotur.

Í 2005 gjørdi Noreg av at seta sær eina kvotu svarandi til 65% av heildarkvotuni. Hetta svaraði til eina hækking á 14%. Tað hevði við sær, at Ísland og Føroyar gjørdu av at hækka sínar kvotur samsvarandi. Ásetan av føroyskum kvotum fyri 2005 og 2006 tók eisini hædd fyri, at eingin atgongd var í norskum sjóøki. Hetta var roknað at svara til 1,23% afturat partinum hjá Føroyum á 5,46%.

Orsakað av vantandi avtalu millum strandarlondini ella sínámillum avtalu við Noreg síðan 2003, hava føroysk skip ikki havt atgongd at fiska í norskum øki ella landað sild í Noregi seinastu trý árini (2004 - 2006). Øll trý árini hava føroysk skip kortini megnað at fiska alla kvotuna í føroyskum, íslendskum og altjóða sjógvi umframt nakað við Svalbard.

Tað tykist, sum sildin tey seinastu árini hevur tikið upp eitt annað ferðingarmynstur, sum minnir um tað gamla mynstrið í 1950'unum, tá ið stovnurin var á leiðunum millum Føroyar og Ísland um veturin. Í staðin fyri, at hon øll fer inn í norskan sjógv, sær tað út til, at sildin nú heldur seg meira úti í norðurhavinum og vestur í føroyskan og íslendskan sjógv.

Kanningarferð í november 2006 veitti tó ikki prógv fyri, at sild var á hesum gomlu vetrarleiðunum. Enn er tí ikki gjørligt at staðfesta, um hetta nýggja

mynstrið verður varandi í longri tíð, ella um sildin aftur fer at halda seg vestanfyri um veturin.

Egnu kvoturnar, sum londini hava sett sær síðani 2004, hava tilsamans havt við sær, at heildarveiðan er vorðin størri, enn hvat ið ICES hevur mælt til. Tað hevur stóran týdning fyri áhaldandi menning av sildastovninum og møguleikar hjá sildini at ferðast vestureftir, at stovnurin ikki verður troyttur ov hart.

Sterka støðan hjá sildastovninum, og møguleikin fyri einum munandi hægri MLV í 2007 gjørdu helst sítt til at skapa ein størri vilja hjá øllum londum, ikki minst eisini Noregi, at fara aftur til eina fimmparta skipan fyri umsiting av norðhavssild. Noreg hevur flutt seg frá sínum frammanundan ófrávíkiliga kravi á 65% niður á 61%. Hini fýra londini, harímillum eisini Føroyar, hava øll verið noydd til at lata nakað, fyri at fáa eina avtalu í lag. ES hevur tó verið til reiðar at lata lutfalsliga mest av øllum.

Føroyar hava latið tilsamans 0,30% av heildarkvotuni samanborið við 1996 avtaluna. Í 1996 avtaluni vóru kortini ymsar flytingar, sum ikki longur eru galdandi í viðurskiftunum millum Føroyar og aðrar partar. Fyrr fingu Føroyar eina flyting í tonsum frá Noregi svarandi til 0,15%, og Føroyar fluttu ES eitt tonsatal svarandi til 0,30%. Tá ið hesar flytingar vórðu avroknaðar, svaraði tonsatalið, ið Føroyar høvdu at ráða yvir í gomlu avtaluni, til 5,31% av heildarkvotuni. Við støði í hesum hava Føroyar í avtaluni fyri 2007 latið 0,15% í mun til 1996 avtaluna.

Føroyar kunnu nú fiska 0,59% afturat av heildarkvotuni í norskum sjógvi, ella tilsamans 3,05%, samanborið við 2,46% atgongd í gomlu avtaluni. Hetta svarar til 59% av føroysku kvotuni á 5,16%. Øll 3,05% (39.000 tons) kunnu verða fiskað í Jan Mayen økinum, men í norska búskaparøkinum norðan fyri 62°N verður atgongdin avmarkað til 2,27% (29.000 tons). Noreg fær atgongd at fiska 2,34% av heildarkvotuni (30.000 tons) í føroyskum øki. Hetta er eisini ein broyting í mun til

1996 avtaluna, tá Noreg hevði eins nógva atgongd til føroyskan sjógv sum Føroyar tilsamans í norskum sjógvi, íroknað Jan Mayen.

Tað hevur havt stóran týdning fyri Føroyar í samráðingunum at hildið fast um gamla prosentpartin upp á 5,46% sum grundarlag í nýggju avtaluni, tá ið prosent verða umroknað til atgongd.

ES hevur øll árini síðani 1996 havt atgongd at fiska 0,85% av heildarkvotuni í føroyskum sjógvi (og Føroyar tilsvarandi í ES sjógvi). Sínámillum atgongd millum Føroyar og ES er ikki tengt at fimmparta avtaluni fyri 2007, og varð avtalað við brævaskifti seinni.

Russland hevur í gomlu avtaluni havt møguleika at fiska 0,5% av heildarkvotuni í føroyskum sjógvi. Samráðingarleiðararnir hava váttað í einum felags brævi, at ynskið hjá Russlandi um atgongd verður tikið upp sínámillum seinni, uttan at nakað prosent- ella tonsatal hevur verið avtalað. Tilskilað er, at talan verður um eina avmarkaða atgongd.

Sínámillum atgongd millum Føroyar og Ísland varð ikki viðgjørd undir strandarlandasamráðingunum. Tey seinastu árini hava hesi viðurskifti verið viðgjørd í sínámillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Ísland, har avtalað hevur verið um fulla sínámillum atgongd.

Til tess at fiskiskapurin eftir norðhavssild í altjóða sjógvi verður avmarkaður í samsvari við gjørda semju millum strandarlondini, varð ein regulering fyri altjóða sjógv samtykt innan NEAFC við postatkvøðu í mai 2007. Tað, ið strandarlondini fiska í altjóða sjógvi, verður roknað frá teirra strandarlandapørtum. Einki er sett av afturat til Grønland ella sum samstarvskvotu í NEAFC økinum.

Grønland var ónøgt við ikki at fáa tillutað nakað av norðhavssild og forðaði tískil fyri, at DFG kundi atkvøða fyri uppskoti um reguleringina av norðhavssild í

NEAFC. DFG var tískil noytt til at atkvøða blankt. Uppskotið var tó samtykt kortini við 4 atkvøðum av 5. Ósemjan millum Føroyar og Grønland forðar hinvegin Grønlandi fyri at kunna taka formliga fyrivarni fyri samtyktini.

### *9.2.2 Makrelur*

Føroyska makrelkvotan í 2007 er 23.134 tons av einari heildarkvotu á 500 tús. tons. Føroyski parturin er 4,63% av heildarkvotuni. Ein partur av heildarkvotuni av makreli er settur av til altjóða sjógv og verður reguleraður í NEAFC.

Ásetingin av heildarkvotuni verður gjørd við støði í veiðisetninginum, sum strandarlondini eru samd um eftir tilmælinum frá ICES.Veiðitrýstið skal liggja um 0,15-0,20. Fer gýtingarstovnurin niður um 2,3 mió. tons, skal veiðitrýstið alt fyri eitt skerjast uppaftur meir. Í seinastu ráðgevingini sigur ICES, at ein heildarkvota millum 390.000 tons og 509.000 tons er innan fyri lívfrøðiliga tryggar karmar.

Av heildarkvotuni verða um 10, 17% sett av til NEAFC. ES ásetur sær egnan part (7%) fyri fiskiskapin í Biskeiavíkini, og Noreg og ES býta restina í sínámillum avtalu, ið ikki er útgreinað í strandarlandaavtaluni.

Ein afturvendandi trupulleiki í samráðingunum er, um makrelfiskiskapurin í Biskeiavíkini skal verða fevndur av avtaluni ella ikki. Føroyar og Noreg vilja hava henda fiskiskapin at vera partur av býtinum millum øll trý londini, men ES stendur fast við sítt.

### *9.2.3 Svartkjaftur*

Svartkjafturin á okkara leiðum er felagsstovnur, sum ferðast millum sjóøkini hjá ES, Føroyum, Noreg og Íslandi, umframt at hann er í altjóða sjógvi.

Ein fleirára semja varð gjørd í 2005 um at skipa fiskiskap eftir svartkjafti í 2006 og eftirfylgjandi ár við føstum býti millum partarnar og einum veiðusetningi, sum skal tryggja eina langtíðar burðardygga gagnnýtslu av stovninum.

Fyri 2006 vóru partarnir samdir um at avmarka fiskiskapin eftir svartkjafti til eina heildarkvotu, sum í mesta lagi var 2 milliónir tons. Parturin hjá Føroyum er 26,125% (522.500 tons í 2006). Ásannnað varð, at ein heildarveiði á 2 milliónir tons í 2006 fór at hava við sær eitt ov høgt fiskideyðatal. Partarnir vóru tí samdir um at í eftirfylgjandi árum skuldi veiðan verða minkað við í minsta lagi 100.000 tonsum um ári.

Fyri 2007 var semja um at minka heildarkvotuna við 300.000 tonsum. Heildarkvotan fór sostatt úr 2 milliónum tonsum niður í 1,7 mió. tons í 2007, og av hesum er føroyski parturin 444.125 tons.

Svartkjaftaavtalan heimilar, at 10% av strandarlandakvotuni hjá hvørjum partinum kundi verða fiskaður í 2007, um ikki øll kvotan varð fiskað í 2006.

Umframt tey fýra strandarlondini, ið hava gjørt sínámillum avtalu, hevur Russland eisini verið við í samráðingartilgongdini eftir serligari innbjóðing, ásannandi tann týdning, sum svartkjaftafiskiskapur hevur fyri Russland, tó at tað er ikki viðurkent sum strandarland.

Føroyar kunnu veiða 2% í norskum sjógvi, og Norra 4% í føroyskum sjógvi. Ójavnvágin í seravtaluni við Noreg skal síggjast í tí høpi, at samsvarandi seravtala um atgongd at fiska makrel hjá hvør øðrum varð undirskrivað millum Føroyar og Noreg, samstundis sum avtalan um atgongd at fiska svartkjaft varð gjørd. Eftir makrelavtaluni kunnu føroyingar fiska tvær ferðir so nógvan makrel í norskum sjógvi, sum norðmenn í føroyskum.

Í sínámillum fiskveiðisamstarvi millum Føroyar og Ísland hava londini frítt at fiska egna svartkjaftakvotu á økinum hjá hvør øðrum, tó fær Ísland ikki havt fleiri

enn 12 skip í føroyskum sjógvi í senn. Føroyar hava undir seinastu samráðingunum við Ísland gjørt greitt, at grundað á stóra áhugan at royna eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi, verður neyðugt at skipa henda fiskiskap eftir neyvari ásetingum í framtíðini.

Í sínámillum avtalu við ES fáa Føroyar 43.500 tons av svartkjafti, meðan ES fær 18.000 tons frá Føroyum. Føroyar og ES hava harumframt avtalað at loyva skipum frá hvørjum av pørtunum at fiska 27.000 tons av egnari svartkjaftakvotu í sjóøkinum hjá hinum partinum. Sostatt kunnu føroysk skip fiska 70.500 tons í ES sjógvi, og ES skip 45.000 tons í føroyskum sjógvi.

Í NEAFC er samtykt, at kvotan í altjóða sjógvi í 2007 er tilsamans 268.550 tons. Av hesum fáa Grønland og Russland tillutað hvør sína nøgd av svartkjafti í altjóða sjógvi, ávikavist 10.000 tons og 137.000 tons. Hesi tonsini koma afturat heildarkvotuni, ið strandarlondini hava sett sær. Veiðan hjá strandarlondunum í NEAFC øki verður roknað frá teirra kvotum í strandarlandaavtaluni

### *9.2.4 Kongafiskur í Irmingerhavinum*

Enn er ongin endalig semja hvørki millum strandarlond ella millum limalondini í NEAFC um, hvussu kvotan av kongafiski skal verða býtt. NEAFC hevur seinastu tvey árini kunna samst um at avmarka heildarveiðuna innan fyri ávísa nøgd, men hevur tó ikki kunna tikið avgerð um, hvussu henda kvotan skal býtast millum londini.

Gongdin hevur verið, at summi lond – t. d. Føroyar og Ísland – hava sett sær kvotu við støði í øðrum ásetingum enn tær, sum NEAFC annars áður hevur lagt til grund fyri býtið. Tí er tann samlaða kvotan av kongafiski, sum limalond hava ásett, munandi størri enn tann kvotan, sum NEAFC hevur samtykt, at limalondini skulu halda seg innanfyri.

Føroyar hava tikið støði út frá gongdini í strandarlandasamráðingunum. Føroyar hava lagt fram eitt krav, sum mett verður, at Føroyar hava rætt til. Ísland hevur eisini lagt fram eitt krav og hevur sett sær samlaða kvotu javnt við hetta kravið. Føroyar hava fylgt Íslandi eftir og í 2005 og 2006 sett ta føroysku kvotuna javnt við kravið, tó stillað eftir samtyktunum hjá NEAFC um heildarkvotu.

Føroyska kravið í strandarlandasamráðingunum er gjørt upp til 8,65%. Av heildarkvotuni í 2006 upp á 62.416 tons varð kvotan sett til 5.400 tons, og av heildarkvotuni í 2005 upp á 75.200 tons varð føroyska kvotan sett til 6.500 tons.

Kongafiskurin í Irmingarhavinum tarnaði fiskiveiðusamstarvinum millum Føroyar og Grønland í 2005 og 2006. Av tí sama var ikki gjørligt at koma til eina semju um sínámillum fiskiveiðusamstarv fyri 2006 fyrr enn út á summarið 2006. Partarnir vóru tá samdir um at halda fast um fyrr tikna avgerð um at viðgera ásetingar av kongafiskakvotum innan fyri strandarlandasamráðingarnar og ikki viðgera tær í sínámillum samráðingum. Undir samráðingunum fyri 2007 hildu partarnir seg til hesa avtalu og samdust um at koma aftur til spurningin, tá ein semja er gjørd millum strandarlondini.

NEAFC hevur samtykt, at limalondini í 2007 skulu avmarka sín fiskiskap innan fyri eina heildarkvotu upp á 46.000 tons, harav í mesta lagi 65% kunnu verða fiskað fyri 15. juli. Hetta svarar til ein niðurskurð samanborið við 2006 upp á 26,3%. Endamálið við tíðaravmarkingini er at verja stovnin (djúpvatnsstovnin) í landnyrðingspartinum av økinum. Tað er fyrst og fremst hesin stovnur, sum Føroyar eiga størri lut í sum strandarland, og sum krevur serligt fyrivarni.

Við støði í heildarkvotuni fyri 2007 og omanfyri nevnda kravi hjá Føroyum sum strandarland er føroyska kvotan í 2007 sett á tilsamans 3.980 tons av kongafiski í Irmingerhavinum, og av hesum kunnu 2.587 tons verða fiskað fyri 15. juli. Kvotan er býtt javnt ímillum 4 skip.

Ikki er væntandi, at møguleikar verða at fiska meira kongafisk á altjóða leiðum í Irmingarhavinum komandi tíðina - heldur tvørturímóti. Fyri 2007 mælti ICES til at stegða fiskiskapinum heilt.

Ein møguleiki at bøta um umstøður hjá føroyskum skipum í hesum fiskiskapi er at fáa atgongd at fiska føroyska kvotu ella partar av henni í íslendskum sjógvi.

## 9.3 Millumlandafelagsskapir í Norðuratlantshavi

Í mun til støðu Føroya sum strandarland í omanfyri lýstu strandarlandaskipanunum, eru Føroyar ikki einstakur limur í millumlandafelagsskapum, so sum NEAFC, NAFO og NASCO[5]. Limaskapurin er í felagi við Grønlandi undir heitinum *Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland* (DFG), har Danmark er formligi sáttmálaparturin. Hetta merkir í virki, at Føroyar og Grønland skulu vera samd um at taka avgerðir (atkvøða) ella mótmæla avgerðum hjá hesum felagsskapum. Hetta kann hava avleiðingar á nógvum økjum, har ið Føroyar og Grønland ikki hava samanfallandi áhugamál (sí t.d. um norðhavssild omanfyri og um rækjumáli í NAFO niðanfyri).

Niðanfyri er greitt frá veiðumøguleikum, sum luttøkan í hesum felagsskapum gevur Føroyum. NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission) er ikki viðgjørt, tí hvalaveiða verður ikki mett at vera partur av arbeiðssetninginum.

### *9.3.1 NAFO (Northwest Atlantic Fisheries Organization)*

NAFO tekur sær av fiskiskapinum í altjóða sjógvi í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum.

[5] Undantakið er NAMMCO (North Atalantic Marine Mammal Commission), har Føroyar og Grønland eru sjálvstøðugir avtalupartar hvør sær, saman við Ísland og Noreg.

Føroyar fiskaðu í mong ár tosk í NAFO-økinum 3M (Flemish Cap), men av tí at stovnurin hevur verið so illa fyri seinastu árini, er bann sett móti beinleiðis toskaveiði. Ikki kann roknast við, at fiskiskapur eftir toski verður tikin uppaftur í bræði. Men ábendingar eru um, at toskastovnurin er við at menna seg og tí kunnu veiðumøguleikar stinga seg upp. Um so verður, skulu Føroyar royna at fáa sín part av kvotuni. Føroyar kunnu eisini skunda undir gongdina við at vera við at gera neyðugu kanningarnar av stovninum.

Í løtuni hava Føroyar, umframt rækjur (sí niðanfyri), eina kvotu á 69 tons av kongafiski í NAFO øki 3M og 206 tons av svartkalva í 3LMNO. Kongafiska-kvotan er reguleráð á tann hátt, at samlaðu kvoturnar hjá limalondunum eru tilsamans nógv meira enn ásetta heildarkvotan á 5.000 tons. Sostatt kann tað koma fyri, at tá ið tey londini, sum hava nógv størri partar, hava fiskað sínar kvotur upp, verður fiskiskapurin steðgaður fyri øllum, áðrenn eitt nú Føroyar hava havt møguleika at fiska sín lítla part. Hesin trupulleikin eigur at verða tikin upp í NAFO og ein onnur rættvísari loysn funnin.

Regulering av svartkalva tekur støði í eini endurbyggingarætlan, har heildarkvotan og teir einstøku partarnir hava minkað stigvíst í tíðarskeiðinum 2004 – 2007. Støða skal nú takast á komandi ársfundinum í 2007 til framtíðar kvotur fyri 2008 og framyvir.

Umframt hetta kann verða fiskað av NEAFC heildarkvotuni fyri kongafisk í Irmingarhavinum í NAFO øki. Hesum møguleika hava føroysk skip ikki gjørt stórvegis brúk av, tá fiskiskapurin hevur verið meira lønandi á NEAFC leiðum.

Føroyar kunnu veiða rækjur á Flemish Cap. Hesin fiskiskapur hevur verið stýrdur við fiskidøgum síðani 1996 og hava Føroyar tilsamans 1606 dagar. Sum eindømi í NAFO er dagatalið tilskilað Føroyum og Grønlandi hvør sær í NAFO kvotutalvuni, har Grønland hevur 515 dagar, heldur enn sum DFG kvota. Tað hevur ikki loyst seg væl at veiða rækjur á Flemish Cap seinastu árini, og tí eru

fiskidagar, sum ikki vera brúktir. Orsøkirnar eru, at lutfalsliga lítið kann veiðast um døgnið, støddirnar eru smáar og marknaðarprísurin lágur.

Føroyar og Grønland hava verið samd um at mótmæla NAFO reguleringini av rækjufiskiskapinum í 3L síðani 2003. Grundarlagið undir mótmælinum er, at føroyska sjónarmiðið um munandi størri lut av rækjukvotuni á 3L, grundað á søguliga føroyska fiskiskapin, ikki hevur verið gingið á møti í NAFO.

Tað kom føroyskum myndugleikum og føroysku rækjuvinnuni dátt við, at Grønland í 2004 setti fram krav um helvtina av kvotuni, sum DFG hevði í hyggju at áseta sær.

Føroyska sjónarmiðið er, at Føroyar hava rættin til 3L rækjukvotuna, tó so at Grønland ikki skal verða verri fyri, enn um NAFO samtyktin varð góðtikin. Tað varð tó givið til kennar, at Føroyar vóru sinnaðar at lata Grønlandi nakað meir enn helvtina av kvotuni, sum Danmark (vegna Føroyar og Grønland) fær eftir NAFO samtyktini.

Hetta endaði summarið 2004 við eini semju, har Grønland fekk 300 tons, sum varð endurtikið í 2005, tí einsíðis ásetta kvotan var óbroytt 1.344 tons við støði í heildarkvotuni á 13.000 tonsum.

Orsakað av at Føroyar (DFG) settu sær eina einsíðis kvotu í 3L, gjørdi Kanada av í desember 2004 at steingja sínar havnir fyri føroyskum og grønlendskum skipum. Havnirnar eru framvegis stongdar.

Føroyar tóku aftur í 2006 stig til at mótmæla NAFO avgerðini, og áseta eina kvotu upp á 2.274 tons, sum er sami partur av NAFO heildarkvotuni sum undanfarin ár, við støði í heildarkvotuni, ið varð hækkað úr 13.000 upp í 22.000 tons fyri 2006. Føroyska sjónarmiðið var, at Grønland ikki av hesi orsøk skuldi

fáa meira enn 300 tons. Grundarlagið undir kvotukravinum í 3L er føroyskur fiskiskapur – ikki grønlendskur.

Samráðingarnar við Grønland fyri 2006 vóru truplar, m.a. eisini av spurninginum um rækjukvotuna. Grønland kravdi at fáa lutfalsliga hækking í rækjukvotuni svarandi til hækkingina í einsíðis settu kvotuni – um 507 tons. Kravið varð lýst frá grønlendskari síðu sum eitt gjald fyri at stuðla Føroyar í at mótmæla NAFO samtyktini fyri 3L og fyri at hava “offrað seg” orsakað av, at kanadiskar havnir framvegis eru stongdar – eisini fyri grønlenskum skipum.  Føroyar og Grønland komu tá ásamt um, at grønlendski parturin í 2006 skuldi verða 450 tons.

Fyri 2007 er aftur mótmælt og egin kvota ásett á sama støði sum í 2006 2.274 tons, herav 450 til Grønland við støði í somu heildarkvotu á 22.000.

Kanada ætlar á komandi ársfundinum í NAFO at leggja fram eitt uppskot um at broyta dagaskipanina fyri rækjur í 3M um til eina kvotuskipan. Hetta ynskið frá Kanada gevur ein møguleika at taka samráðingar um býtið av rækjum í 3L upp aftur saman við 3M, til tess at royna at fáa eitt varandi og rættvíst býti í lag, sum viðurkennir føroyska kravið á nøktandi hátt. Ásannast skal kortini, at ein varandi loysn fyri 3L fer valla at geva sama tonsatalið sum núverandi einsíðis kvota. Tá kunnu viðurskiftini við Grønland  spæla ein avgerandi leiklut í mun til, hvussu nógv tons av rækjum føroysk skip fáa at ráða yvir í 3L, (um so er at Grønland hevði verið til reiðar at slept sínum kravi um ein størri part í 3L).

Menning av fiskiveiðumøguleikum snýr seg eisini um annað enn at økja um tonsatalið. At arbeiða fyri at betra um umstøður hjá verandi fiskiskapi eigur eisini altíð at vera havt í huga. Sum dømi kann nevnast rækjuveiða í NAFO øki 3L. Umframt  smábýttu kvotuna (sum DFG hevur mótmælt) eru eisini tíðaravmarkingar í fiskiskapinum og tal av skipum. Tað er bert loyvt einum skipi frá hvørjum flagglandi at fiska í senn í økinum. Á ársfundinum í 2006 fingu Føroyar undirtøku fyri at avtaka tíðaravmarkingina, sum hevði verið galdandi í tíðarskeiðanum 15.

september – 30. november. Nú er økið opið alt árið, undantikið frá 15. apríl til 1. juli. Arbeiðast kann víðari við slíkum tekniskum spurningum til tess at bøta um møguleikarnar og umstøðurnar í verandi fiskiskapinum, umframt at viðgera møguleikar fyri at seta heildarkvotuna longri upp. Rækjustovnurin í 3L er væl fyri og tolir helst størri veiðutrýst. Hinvegin kunnu stórar hækkingar í heildarkvotuni frá einum ári til næsta óivað eisini ávirka marknaðarprísin á negativan hátt.

Vinnan vísir á, at ein møguleiki fyri nýggjum fiskiskapi í NAFO er lodnuveiða. Hendan lodnuveiða kann verða veitt uppisjóvarskipum, sum, eftir at svartkjafturin er uppfiskaður, kunnu fara í NAFO økið at veiða lodnu.

Viðmerkjast skal, at í sambandi við tilgongdina í NAFO at dagføra og nútímansgera sáttmálan, hava Føroyar og Grønland skotið upp at broyta sáttmálan soleiðis, at eindir (*entities* – soleiðis sum útgreinað er í Havrættasáttmálanum, grein 305)[6] eisini kunnu gerast sáttmálapartar í NAFO. Undirtøka er fyri hesari broyting, tó hevur Russland framvegis eitt fyrivarni. Uppskot til dagførda NAFO sáttmálan verður til viðgerðar á NAFO ársfundinum í september 2007.

Um so er at henda broyting verður formliga staðfest, kann tað síðan lata upp fyri at Føroyar og Grønland gerast hvør sín sáttmálapartur í NAFO. Tá hevði ikki longur verið neyðugt hjá Føroyum at taka atlit til grønlendsk áhugamál, tá

---

- [6] *UNCLOS /1982 Convention* - **Article 305, paragraph 1:**

  c) all self-governing associated States which have chosen that status in an act of self-determination supervised and approved by the United Nations in accordance with General Assembly resolution 1514 (XV) and which have competence over the matters governed by this Convention, including the competence to enter into treaties in respect of those matters;
  d) all self-governing associated States which, in accordance with their respective instruments of association, have competence over the matters governed by this Convention, including the competence to enter into treaties in respect of those matters;
  e) all territories which enjoy full internal self-government, recognized as such by the United Nations, but have not attained full independence in accordance with General Assembly resolution 1514 (XV) and which have competence over the matters governed by this Convention, including the competence to enter into treaties in respect of those matters.

fiskiveiðumøguleikar verða býttir í NAFO, og heldur ikki skulu Føroyar “gjalda” fyri eina semju við Grønland um atkvøður ella mótmæli í málum, sum bert hava áhuga fyri Føroyar.

### *9.3.2 NEAFC (Northeast Atlantic Fisheries Commission)*

Tá talan er um millumlanda regulering av fiskiskapi hevur NEAFC í fyrstu atløgu heimild at samtykkja skipanir fyri fiskiskapi í altjóðasjógvi í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum. Samtyktir hjá NEAFC viðvíkjandi ferðandi fiskastovnum taka vanliga støði í avtalum, ið frammanundan eru gjørdar millum strandarlondini, soleiðis sum lýst er í sambandi við norðhavssild, makrel og svartkjaft.

Um avvarðandi strandarlandið tekur undir við tí, kann NEAFC eisini samtykkja skipanir fyri økið innan fyri 200 markið (grein 6 í sáttmálanum).

<u>Kongafiskur í Irmingerhavinum</u>

Sum áður nevnt er enn eingin semja millum strandarlondini (Føroyar, Grønland og Ísland) um kongafisk í Irmingerhavinum. Tó er ein skipan fyri 2007 samtykt í NEAFC, sum ber í sær eina heildarkvotu á 46.000 tons, harav bert 29.900 (65%) kunnu verða veidd áðrenn 15. juli. Endamálið við hesari avmarking er at verja stovnin í landnyrðingspartinum av økinum.

<u>Kongafiskur í Norðurhøvum (ICES I & II)</u>

Beinleiðis fiskiskapur eftir kongafiski í ICES øki II (Norðurhøvum) tók seg av álvara upp í 2005. Í fjør kom samlaða veiðan í altjóða sjógvi upp á 27.000 tons, og um 40 skip úr fleiri londum luttóku í fiskiskapinum. Av hesum fiskaðu føroysk skip tilsamans sløk 4.000 t.

Á eykafundi í NEAFC í juni 2007 legði Noreg fram, við stuðli frá Íslandi og ES, eitt uppskot um at steðga øllum beinleiðis fiskiskapi og at avmarka hjáveiðu í

øðrum fiskiskapi til bert 1%. ICES mælir eisini til, at eingin beinleiðis veiða verður. Føroyar og Russland arbeiddu hinvegin fyri at loyva einum avmarkaðum fiskiskapi.

Semja varð um at regulera hendan fiskiskapin soleiðis, at tað í tíðarskeiðinum frá 1. september til 15. november er loyvt at fiska av eini heildarkvotu upp á 15.500 tons. Heildarkvotan er ikki býtt millum londini, og veiðan skal boðast frá til NEAFC, sum heldur eyga við gongdini í fiskiskapinum og síðani boðar limalondunum frá, tá ið heildarveiðan er uppfiskað, og fiskiskapurin skal steðga aftur (um hetta er áðrenn 15. november). Hjáveiða av kongafiski í øðrum fiskiskapi skal verða avmarkað til 5% og verður roknað frá heildarkvotuni.

Reguleringar fyri 2008 verða viðgjørdar á NEAFC ársfundinum í november 2007, tá tað vónandi verður møguligt at koma ásamt um annað enn bert fyribils tiltøk fyri umsiting av kongafiski á hesum leiðum.

Djúphavsfiskiskapur

Fiskiskapurin eftir djúpshavsfiski í altjóða sjógvi hevur verið á dagsskránni hjá NEAFC seinastu árini. Djúphavsfiskur er vanliga roknaður sum fiskur, ið heldur til á 400 m og djúpri. Semja er um, at í fiskiskapinum eftir djúphavsfiski eigur at farast fram við varsemi, tí talan er um viðbrekin fiskasløg, sum vaksa seint og tola lítla roynd.

NEAFC hevur í tí samtykt, at royndin eftir djúphavsfiski skal avmarkast og at steingja leiðir í altjóða sjógvi fyri fiskiskapi við botntroli og faststandandi reiðskapi fyri at verja habitat og korallir á havbotninum.

Føroyar hava tikið undir við samtyktunum í NEAFC. Soleiðis sum føroyski fiskiskapurin í altjóða sjógvi hevur verið seinastu árini, fara tiltøkini í lítlan mun at nerva virksemið hjá føroyskum skipum. Harafturat hava Føroyar stuðlað samtyktunum út frá sjónarmiðinum um, at avgerðir um fiskiskap í altjóða sjógvi í

mest møguligan mun eiga at verða tiknar í regiónalum felagsskapum (NEAFC, NAFO o.l.) og ikki globalt, t.d. í ST-skipanini, har tað oftani eru onnur enn fiskiveiðitjóðirnar, ið seta dagsskránna.

Á ársfundinum hjá NEAFC í 2004 var semja um, at limalondini skulu avmarka royndina (effort'in) eftir djúphavsfiski. Fyri 2005 og 2006 varð ásett, at royndin ikki skal fara upp um 70% av tí mesta, hon hevur verið undanfarin ár. Á ársfundinum í heyst varð gjørt av, at royndin í 2007 ikki skal fara upp um 65% av tí mesta, hon hevur verið undanfarin ár.

Orðingarnar í samtyktini geva londunum rættiliga rúmar ræsir fyri sjálvi at gera av, hvussu tey avmarka royndina og, hvat tey velja sum mát fyri effort (framtøkumegi, BT, fiskidagar ella skipatal). Harafturat er tað upp til londini sjálvi at gera av, hvat "undanfarin ár" ella tilvísingartíðarskeiðið er.

Fiskivinnustovan hevur valt at brúka fiskidagar sum mát fyri roynd og árini frá 1985-2000 sum tilvísingartíðarskeið. 1995 var besta árið í hesum tíðarskeiði. Tá royndu 16 føroysk skip í 524 dagar í altjóða sjógvi í NEAFC økinum. Eftir hesum kunnu føroyingar fiska í tilsamans **341 dagar** í NEAFC-økinum í 2007 (65% av 524). Hetta dagatal er væl omanfyri tað dagatal, føroysk skip hava fiskað seinastu árini.

Á ársfundinum í NEAFC í 2006 var skotið upp (ES) at banna allan fiskiskap eftir búrfiski. Kortini varð samtykt bert at steðga fiskiskapinum fyribils frá 1. januar til 30. juni 2007. Føroyar hava síðan skotið upp at gera eina skipan, sum loyvir avmarkaðan fiskiskap eftir búrfiski á teimum leiðum, har búrfiskastovnarnir ikki frammanundan hava verið ov hart troyttir. Sambært vísindaligari ráðgeving frá ICES tolir búrfiskur, sum er eitt sera viðbrekið og seint vaksandi fiskaslag, bert sera avmarkaða roynd. Fyribils steðgurin í fiskiskapinum eftir búrfiski er nú longdur til árslokið. Uppskotið hjá Føroyum verður grundarlag fyri eini endaligari støðutakan á ársfundinum hjá NEAFC í november, tá ið fyribils steðgurin

væntandi verður avtikin, og ávísar leiðir latnar uppaftur fyri avmarkaðum fiskiskapi aftur í 2008.

Garnabann

Óskipaði fiskiskapurin við gørnum á djúphøvunum í altjóða sjógvi kann hava skaðiliga ávirkan á fiskastovnarnar Gørnini standa ofta ov leingi, og nógv av tí, ið kemur í gørnini fer fyri skeyti. Staðfest er eisini, at nógv mist gørn liggja á botni í altjóða sjógvi í NEAFC-økinum (ghost fishing).

Tí hevur NEAFC gjørt av, at áðrenn nøkur NEAFC-skipan er fingin at regulera fiskiskapin, skal allur fiskiskapur við gørnum verða bannaður í NEAFC-økinum, har dýpið er meira enn 200 m.

Stongdar leiðir í altjóða sjógvi

Á NEAFC ársfundinum í 2004 varð samtykt at friða fimm leiðir fyri botntroli og faststandandi reiðskapi. Friðingarnar eru galdandi til ársenda 2007. Lagt er upp til, at ICES hesa tíðina skal arbeiða víðari við spurningum um vísindaliga grundarlagi fyri friðing av viðbreknum økjum (habitat).

Á ársfundinum í 2006 varð gjørt av, at stongja fýra øki á Hatton Bank og Rockall afturat. Endamálið er fyrst og fremst at verja korallir.

Føroyar hava tikið undir við samtyktunum um stongdar leiðir, men hava samstundis gjørt vart við, at stongdu leiðirnar eiga at eftirmetast í góðari tíð áðrenn ársenda 2007. Føroyar hava somuleiðis lagt dent á, at greiðar leiðreglur og mannagongdir eiga at verða fyri at steingja øki í altjóða sjógvi. Hesir spurningar verða nærri viðgjørdir í einum serligum arbeiðsbólki hjá NEAFC – PECMAS (Permanent Committee on Management and Science).

Hávafjaðrar

Á ársfundinum í 2006 varð samtykt at seta eina skipan í verk, sum er ætlað at avmarkað tøku av hávafjaðrum ("shark finning"). Tað eru fleiri lond í NEAFC sum ivast í um hendan regulering hevur nakað "conservation value". PECMAS skal tí eftirmeta skipanina.

### *9.3.3 NASCO*

Sáttmálin um at varðveita laksin í Norðuratlantshavi, NASCO, kom í gildi 1. oktober 1983. Í NASCO eru Føroyar limir í nevndini fyri Landnyrðingsatlantshavið, og Grønland limur í nevndini fyri Vesturgrønland.

Tað vóru bara Føroyar og Grønland, sum høvdu kvotu á sínum havøki, men kvoturnar eru lækkaðar ár undan ári. Føroyar høvdu í 1999 eina laksakvotu uppá 330 tons, sum 10 skip kundu veiða.

Royndin eftir laksi hevur verið lítil seinastu árini. Í 2000 royndi eitt skip. Føroyar hava ikki longur kvotuáseting við tekniskum reguleringum, men hava á ársfundinum í NASCO boðað frá, at Føroyar halda fast við rættin at veiða laks grundað á bestu vísundaligu tilráðingina.

### *9.3.4 ICCAT*

Altjóða felagsskapurin til varðveitan av tun í Atlantshavi, ICCAT, fevnir um ymisk tunasløg, og av hesum er bláfjøður tun serliga áhugavert fyri Føroyar. Føroyar luttóku sum eygleiðarar í ICCAT frá 1996-2002, men hava ikki luttikið síðan.

Fiskiskapurin eftir tunfiski í føroyskum sjógvi – serliga bláfjøður tun – tók seg upp í 1997, tá japonsk skip vóru her á royndarveiði sambært avtalu við

Fiskirannsóknarstovuna. Hesin royndarfiskiskapur helt fram til 2003. Føroysk skip vóru á tunfiskaveiðu frá 1998 til 2000.

Hetta førdi til mótmælisskriv frá ICCAT í 2000 og 2001, har ført varð fram, at føroyska veiðan var brot á ICCAT samtyktir, tí Føroyar ikki vóru limir í ICCAT og ikki høvdu avtalu um samstarv. Heitt varð á Føroyar at steðga fiskiskapinum, annars kundu handilstiltøk viðv. bláfjøður tun setast í verk móti Føroyum.

Føroyar vístu á, at vit ikki eru bundin av avgerðum hjá ICCAT, har vit ikki eru limur. Men sum strandaland fyri tunfisk eru vit áhugaði í, at tunfiskurin verður umsitin á burðardyggan hátt. Galdandi skipan fyri kvotubýti ger tó, at Føroyar ikki hava áhuga í limaskapi, tí Føroyar høvdu ikki fingið nakra kvotu, við tað at býtið bert er grundað á søguliga veiðu. Men um rætturin hjá strandarlondum verður tikin við í býtisskipanina, høvdu Føroyar væntandi gjørst limur.

Í 2001 samtyki ICCAT nýggja býtisskipan fyri tunfisk ("Allocation Criteria) har áhugamálini hjá strandarlondum verða vird, og felagsskapurin skuldi síðan fara undir at býta tunfiskin av nýggjum. Ísland gjørdist limur innan ársfundin í 2002, og Noreg í 2004. Noreg hevur fingið tillutað veiðu av eini kvotu uppá 100 tons av bláfjøður tun av felagskvotuni hjá teimum, sum ikki hava serstaka kvotu í 2005 og 2006. Føroyar eru ikki enn vorðnar limur, og hava heldur ikki verið eygleiðari á ICCAT fundum seinastu árini. Hetta kemst mest av, at áhugin fyri tunfiski er minkaður, og eingin fiskiskapur hevur verið í føroyskum sjógvi síðan 2003.

## 10. Fylgiskjal 3. Nýggjar leiðir

Karmarnir fyri fiskiskapi í altjóða sjógvi eru broyttir nógv seinastu 20-30 árini. Gongdin í havrættinum hevur verið, at alsamt fleiri millumtjóða skipanir eru settar í verk, sum avmarka rásarúmið í fiskiskapinum í altjóða sjógvi.

Innan karmarnar av Havrættarsáttmálanum frá 1982, ST-fiskastovnaavtaluni frá 1995 og øðrum millumtjóða skipanum eru lond gingin saman fyri at varðveita og umsita fiskastovnar í altjóða sjógvi.

Føroyskir myndugleikar hava tikið undir við Havrættarsáttmálanum og ST-sáttmálan frá 1995. Við hesum hava vit sum flaggland átikið okkum ábyrgd og skyldur í sambandi við fiskiskap í altjóða sjógvi.

Havrættarsáttmálin og ST-sáttmálin frá 1995 leggja upp til samstarv millum lond um at varðveita og umsita fiskastovnar í altjóða sjógvi, og at hetta samstarv fyrst og fremst skal fara fram á regiónalum stigi við millumtjóða avtalum, skipanum ella felagsskapum.

Fyrsta treytin fyri at føroysk skip skulu fiska á leiðum í altjóða sjógvi, er at vit halda okkum til altjóða leikreglur, eitt nú við at gerast partur av samstarvinum um fiskiskap á leiðum, sum eru reguleraðar av felagsskapum ella øðrum skipanum.

Í tí sambandi er spurningurin m.a., hvørjar treytirnar eru fyri at gerast partur av samstarvi, hvat skal til fyri at lúka hesar treytir, og hvat vit fáa burtur úr í fiskimøguleikum við at gerast limir. Hesir spurningar kunnu viðgerast við at hyggja at altjóða rætti á økinum og praksis hjá avvarðandi felagsskapum.

ST avtalan um varðveiting og umsiting av millumøkja- og víðferðandi fiskastovnum frá 1995 hevur á trimum økjum ásetingar, sum snúgva seg um nýggjar limir ella luttakarar í regiónalum samstarvi:

1. Grein 8 sigur, at lond (states), sum hava “real interest” í fiskiveiðu í økinum, kunnu gerast limir í avvarðandi regiónala felagsskapi. Hugtakið “real interest” er ikki útgreinað í avtaluni ella aðrastaðni. Tí er torført at siga, hvat ítøkiligt liggur í hugtakinum, ella hvat skal til hjá londum at lúka hesa treyt. Tað hevur eisini víst seg at elva til stríð, t.d. undir samráðingunum um at stovna *Western and Central Pacific Fisheries Commission,* WCPFC, har mikil orðadráttur var millum strandalond og fjarfiskitjóðir. Hugsandi er eisini, at tað í stóran mun er upp til einstøku regiónalu felagsskapirnar at gera av, hvat “real interest” merkir. Sum dømi kann nevnast, at ein av nýggjaru felagskapunum, *South-East Atlantic Fisheries Organization*, SEAFO, hevur sett í sjálvan sáttmálan, at hann er opin fyri øllum londum ella felagsskapum av londum, hvørs før fiska ella hava fiskað í økinum eftir fiskasløgum, konvensjónin fevnir um, í fýra ára skeiðnum fyri, at sáttmálin varð samtyktur. Hendan áseting kann tulkast, sum teirra allýsing av “real interest”-hugtakinum.
2. Grein 10 hevur ásetingar um skyldur hjá londum í eini felagsskapi. Hesar snúgva seg í stuttum um, at lond, sum eru ella gerast limir, skulu fylgja samtyktum og skipanum í felagsskapinum.
3. Grein 11 ásetir, hvørji rættindi nýggir limir hava. Tað snýr seg m.a. um, hvussu og undir hvørjum treytum nýggir limir ella luttakarar gerast partur av einum regiónalum felagsskapi. Grein 11 nevnir fleiri viðurskifti, ið verandi limir/luttakarar eiga at hava í huga, tá eitt land biður um at gerast partur av samstarvinum, og hvørji rættindi/fyrimunir nýggja landið kann fáa. M.a. støðan hjá fiskastovnunum og verandi fiskiorka á leiðini, umframt tørvin hjá strandalondum og fiskiveiðisamfeløgum í strandalondum.

Samanumtikið hava Føroyar tikið undir við altjóða sáttmálum og avtalum, sum hava álagt okkum skyldur, m.a. um at samstarva um varðveiting og umsiting av fiskastovnum í altjóða sjógvi. Skulu skip undir føroyskum flaggi fiska í altjóða sjógvi, har vit ikki fiska í dag, er treytin, at vit halda okkum til altjóða leikreglur og fylgja teimum samtyktum, sum galda fyri avvarðandi fiskileiðir í altjóða sjógvi. Dømi um hetta verður komið nærri inn á í næsta parti.

## 10.1 Regionalir felagsskapir

Niðanfyri verður við støði í sáttmálaøkjunum hjá regiónalum felagsskapum í Suðuratlantshavinum, Suðuríshavinum og Suðurindiskahavinum hugt at, hvørjir fiskimøguleikar eru har, hvørjar reguleringar eru og undir hvørjum treytum Føroyar kunnu sleppa upp í part.

Felagskapirnir/skipaninar, ið verða umrøddir, eru hesir:

- SEAFO, South-East Atlantic Fisheries Organization
- CCAMLR, Commission for the Conservation of Antarctic Marine Living Resources
- SPRFMO, South Pacific Ocean Regional Fisheries Agreement
- SIOFA, Southern Indian Ocean Fisheries Arrangement

Mynd 3. FAO kort yvir fiskiveiðusamstarv og felagsskapir




Kelda: Fiskimálaráðið

### *10.1.1 SEAFO*

SEAFO var settur á stovn við sáttmála, sum kom í gildi í 2003. Økið hjá felagsskapinum er altjóða sjógvur í landsynningspartinum av Atlantshavinum suður ímóti CCAMLR-økinum.

Mynd 4. Sáttmálaøkið hjá SEAFO og uppskot um uppbýti av økinum.




Kelda: www.seafo.com.

Luttakarar eru Angola, Namibia, Noreg og ES. *Non-member signatories* eru Suðurafrika, Stórabretland (on behalf of St. Helena and its dependencies of Tristan da Cuhna and Ascension Island), Ísland, Suðurkorea og USA.

Høvuðsfiskasløgini í altjóða sjógvi í økinum hjá SEAFO eru Alfonsino, rossamakrelur, Chub-makrelur, búrfiskur, djúphavskrabbi, høgguslokkur, patagonskur tannfiskur og hake.

Fiskiskapurin hevur ikki verið stórur í altjóða sjógvi, men áhugin fyri at royna har, hevur verið vaksandi seinastu árini. Veiðuhagtølini fyri SEAFO eru ófullfíggjað. Tølini í talvu 1 niðanfyri skulu tí takast við fyrivarni, men tey geva ábending um, hvørji fiskasløg hava vinnuligan áhuga.

Talva 1. Høvuðssløgini í fiskiskapi í SEAFO 2002 – 2005. Tons.

| Ár | Patagonskur tannfiskur | Búrfiskur | Alfonsino | Djúphavskrabbi |
|---|---|---|---|---|
| 2002 | 18,3 | 9,0 | | |
| 2003 | 345,7 | 27,4 | | |
| 2004 | 202 | 14,7 | 910 | |
| 2005 | 7,2 | 18,1 | 55 | 289 |

Kelda: Report of SEAFO Scientific Committee 2006

SEAFO umsitur bert fiskastovnar í altjóða sjógvi, íroknað millumøkja stovnar og búfastar stovnar, sum aðrir økisfelagsskapir ikki umsita.

Higartil hevur felagsskapurin samtykt skipanir fyri eftirlit við fiskiskapinum. Talan er um fylgisveinaeftirlit við fiskiførum, havnaeftirlit við útlendskum skipum, bann fyri umskiping í sjónum og eftirlit við umskiping í havnum, umframt skráseting av skipum, sum hava tikið lut í ólógligum, ófráboðanum og óskipaðum fiskiskapi.

Felagskapurin hevur eisini stongt nakrar leiðir í altjóða sjógvi fyri fiskiveiðu fyri at verja viðbrekin habitat og vistskipanir á djúpum sjógvi. Samtyktir eru somuleiðis gjørdar fyri hjáveiðu av hávi í øðrum fiskiskapi, tøku av hávafjarðum, umframt eina skipan fyri at minka um hjáveiðuna av sjófugli í fiskiskapi.

SEAFO hevur ikki sett heildarkvotur og kvotur fyri fiskastovnar ella býtt fiskirættindi. Heldur ikki eru hámarksveiða ella aðrar samtyktir gjørdar fyri uppsjóvarfisk.

Føroysk skip hava ikki fiskað í altjóða sjógvi í SEAFO-økinum, síðani felagsskapurin varð stovnaður. Fiskimálaráðið hevur heldur ikki merkt nakran ítøkiligan áhuga fyri føroyskum fiskiskapi í økinum seinastu árini.

Skulu skip undir føroyskum flaggi fiska á leiðunum har suðuri, er treytin, at føroyskir myndugleikar samstarva um umsiting av fiskastovnunum. Hetta kann

gerast við limaskapi í SEAFO ella í minsta lagi við at fylgja reglunum, sum SEAFO setir.

Viðvíkjandi limaskapi er SEAFO-konvensjónin opin fyri *"...all States and regional economic integration organisations whose vessels fish, or have fished in the Convention Area, for fishery resources covered by this Convention, in <u>the four years preceding the adoption of the Convention</u>."* (okkara undirstriking). Hetta kann roknast sum allýsingin hjá SEAFO av "real interest". Ein trong tulking av hesum merkir, at Føroyar ikki kunnu gerast ein formligur partur av SEAFO sum limur.

Ein annar møguleiki fyri formligum tilknýti til SEAFO kundi verði "co-operating Non-Contracting Party", men hesin møguleikin kann útilokast, tí SEAFO hevur ongar nærri reglur ella samtyktir um hetta, og higartil hevur eingin fingið slíka støðu. Í SEAFO konvensjónini eru annars ásetingar, sum beinleiðis vísa til Non-Contracting Party. Hetta bendir á, at londini, sum samráddust um og staðfestu konvensjónina hava havt Non-Contracting Party í huga. Ásetingar hava kortini ikki verið beinleiðis brúktar.

### *10.1.2 CCAMLR*

CCAMLR-nevndin varð sett á stovn við støði í Convention on the Conservation of Antarctic Marine Living Resources, sum er ein partur av The Antarctic Treaty System. CCAMLR-sáttmálin kom í gildi 1982 og fevnir um alt sjóøkið í Suðuríshavinum sunnanfyri 60º S.

CCAMLR-sáttmálin umsitur alt livandi tilfeingi í sjónum í sáttmálaøkinum, t.e. allir fiskastovnar, skeljadjór, krabbadjór og øll sløg av livandi verum, íroknað fugl. Hvalur og kópur eru tó undantikin.

Limir í CCAMLR eru Argentina, Australia, Belgia, Brasilia, Chile, EF, Frakland, Týskland, India, Italia, Japan, Namibia, New Zealand, Noreg, Póland, Russland, Suðurafrika, Suðurkorea, Spania, Svøríki, Ukraina, UK, USA og Uruguay.

Lond sum eru partur av konvensjónina, men ikki limir í Kommisjónini eru Bulgaria, Cook Islands, Finnland, Grikkaland, Kanada, Kina, Mauritius, Niðurlond, Peru og Vanuatu.

Talva 2. Høvuðssløgini í fiskiskapi í CCAMR 1996 – 2006. Tons.

| | Patagonskur tannfiskur, *Dissostichus eleginoides* | Antarktiskur tannfiskur, *Dissostichus mawsoni* | Krill, *Euphousia superba* | Mackrel icefish, *Champso-cephalus gunnari* | Annað | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1996/97 | 12.457 | | 75.653 | 227 | 185 | 88.522 |
| 1997/98 | 13.370 | 42 | 90.098 | 122 | 168 | 103.800 |
| 1998/99 | 13.367 | 296 | 101.957 | 267 | 305 | 116.192 |
| 1999/00 | 16.913 | 751 | 114.430 | 4.251 | 682 | 137.027 |
| 2000/01 | 13.178 | 626 | 104.182 | 2.097 | 480 | 120.563 |
| 2001/02 | 13.987 | 1.354 | 125.987 | 3.532 | 1.652 | 146.512 |
| 2002/03 | 16.479 | 2.029 | 117.728 | 4.331 | 1.988 | 142.555 |
| 2003/04 | 13.292 | 2.584 | 118.166 | 2.762 | 2.085 | 138.889 |
| 2004/05 | 11.821 | 4.438 | 127.035 | 2.052 | 2.160 | 147.506 |
| 2005/06 | 12.364 | 4.667 | 106.591 | 2.848 | 1.611 | 128.081 |

Kelda: Statisticaal Bulletin, Volume 19(1997-2006), tøkt á http://www.ccamlr.org/pu/E/e_pubs/sb/vol19.htm

Høvuðsfiskasløgini í vinnuliga fiskiskapinum, roknað í nøgd, eru tannfiskur, krill og mackerel icefish. Serliga hevur verið stórur áhugi fyri tannfiski, sum samstundis er tað fiskaslagi, CCAMLR hevur mest reguleringar fyri.

Nevndin í CCAMLR hevur síðani felagsskapurin varð stovnaður, samtykt eina ørgrynnu av skipanum fyri at varðveita og umsita livandi tilfeingi í sjónum. Ein skipan er sett í verk fyri fiskiveiðieftirlit. Somuleiðis ein millumtjóða vísindalig eygðleiðaraskipan, sum ber í sær, at granskarar verða settir umborð á fiskifør, sum

eygleiðarar. Felagsskapurin hevur eisini eina rættiliga víðfevnda skipan fyri veiðidagbøkur og onnur skjøl í sambandi við fiskiskap og handil við tannfiski.

CCAMLR samtykkir á hvørjum ári tilmæli um heildarkvotur fyri fiskaskapin í økinum. Heildarkvoturnar verða ikki býttar út á limalondini. Í onkrum førum verða heildarkvoturnar tó býttar eftir avtalu millum londini, sum taka lut í avvarandi fiskiskapi.

Viðvíkjandi tannfiski eru tilmæli samtykt fyri 2007, sum bera í sær, at heildarkvota er sett fyri ávísar leiðir í CCAMLR-økinum, eins og ásett er, nær loyvt er at fiska. Eisini eru samtyktir, sum loyva royndarveiðu eftir tannfiski innan ávísa hámarksveiðu á ávísum leiðum.

Felagsskapurin hevur eina víðfevnda skipan fyri veiðiskjøl í sambandi við eftirlit av fiskiskapi og millumtjóða handli við patagonskum tannfiski.[7]

Fyri krill eru eisini samtyktar heildarkvotur fyri fiskiskip tríggjar høvuðsleiðir.[8] Íløgan í skip og nýggjastu tøknina til krillveiðu er rættuliga stór, samstundis sum vágin er stórur.

Føroyingar hava verið í Suðuríshavinum. Eitt skifti fyrst í 1990-unum royndu tvey skip eftir patagonskum tannfiski. Í sambandi við, at føroysk skip vóru har suðuri var Danmark (vegna Føroyar) boðið við sum eygleiðari á ársfundinum hjá CCAMLR í 1999.[9]

[7] Sí Conservation Measure CM 10-05(2006) – Catch Documentation Scheme for *Dissostichus* spp
[8] Meiri fæst at vita á allar samtyktirnar hjá CCAMLR á http://www.ccamlr.org/pu/E/e_pubs/cm/06-07/all.pdf).
[9] Brot úr frágreiðingini frá fundinum: "*Mauritius and Namibia were invited to attend as observers in accordance with CCAMLR-XVII, paragraph 15.2. Both were represented at the meeting. Also invited were a number of non-Contracting Parties who were known to have interests in ishing or trade of Dissostichus spp. in the Convention Area: Belize, Denmark (in respect of the Faroe Islands), Panama, Portugal, Seychelles and Vanuatu. Denmark was represented*"

Í seinastuin hevur Fiskimálaráðið havt onkran fyrispurning um møguleikarnar hjá føroyskum skipum at fiska tannfisk í CCAMLR-økinum. Støða Fiskimálaráðsins er samsvarandi altjóða leikreglum, at skulu føroysk skip fiska harniðri, er fyrsta treytin, at føroyskir myndugleikar samstarva um umsiting av fiskastovnunum, antin formliga við at gerast partur av CCAMLR ella í minsta lagi fylgja reglunum, sum CCAMLR setir, samsvarandi skyldum okkara sum flaggland.

Viðvíkjandi limaskapi í CCAMLR er sáttmálin opin fyri *".. any State interested in research or harvesting activities in relation to the marine living resources to which this Convention applies."*

CCAMLR hevur tvey sløg av limaskapi: 1) Limir í CCAMLR nevndini, sum gjalda limagjald, taka lut í vísindaligum kanningum og/ella fiskiveiði, og hava atkvøðurætt. 2)*Acceding States*, sum hava áhuga í kanningum ella fiskiveiði, sum ikki gjalda limagjald, men hava bundið seg til ásetingarnar í sáttmálanum.

Í CCAMLR-konvensjónini er bert ein áseting um "non-contracting parties" (grein X(1)): *The Commission shall draw the attention of any State which is not a Party to this Convention to any activity undertaken by its nationals or vessels which, in the opinion of the Commission, affects the implementation of the objective of this Convention.*

CCAMLR er annars ein at teimum felagsskapunum, sum er virkin í at bjóða ikki-limalondum, sum fiska í økinum, at gerast limir ella at vera við sum eygleiðarar á fundum. Tey hava eisini fest ein politikk á blað um hetta.[10] Hesin politikkur letur upp fyri samstarvsmøguleikum á nógvum økjum. Í CCAMLR er tað týdningarmesta øki, sum leggur upp til samstarv við NCP, skipanin fyri tannfisk.[11]

Hinvegin sigur hesin politikkur einki um, hvørjar fyrimunir roknast kann við av at samstarva.

[10] CCAMLR samtykti í 1999 "*Policy to Enhance Cooperation between CCAMLR and non-contracting Parties*"

[11] Conservation Measure CM 10-05(2006) – Catch Documentation Scheme for *Dissostichus* spp

### 10.1.3 SPRFMO

SPRFMO er undir stovnan, og Føroyar hava verið við á einum fundi. Talan er um sjóøki í landsynningsparturin av Stillahavinum, men økið er ikki nágreiniliga ásett enn.

Mynd 2. Fyribilssjóøki, sum SPRFMO fevnir um.




Kelda: SPRFMO

Í døgunum 30. apríl til 4. mai 2007 vóru umboð fyri Fiskimálaráðið við í millumlanda samráðingum í Kili um at stovna ein økisfelagsskap fyri fiskiveiði í Suðurkyrrahavinum (*South Pacific Regional Fisheries Management Organisation* – SPRFMO. Fundurin var triðja samráðingarumfarið, síðan Ný Sæland, Australia og Kili í februar 2006 tóku stig til at kalla saman til samráðingar um at skipa fiskiskap í altjóða sjógvi. Annar fundur varð hildin í november 2006.

Hesi lond vóru við á fundinum: Australia, Canada, Chile, Kina, Kolombia, Cook Islands Ecuador, EF, Føroyar, Frakland (vegna Ný Caledonia, Franskt Polenesia og Walles and Fortuna), Japan, Korea, Mikronesia, Ný Sæland, Niue, Palau, Papua Ný Guinea, Peru, Russland, Tapei, Vanuatu, USA, og Ukraina.

Ætlanin við nýggja felagsskapinum er at skipa fiskiskapinum í altjóða sjógvi eftir uppisjóvar fiskastovnum m.a. rossamakreli, umframt djúphavsfiskasløgum sum búrfiski og tannfiski. Nýggi felagsskapurin fevnir um flestu leiðirnar í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum, frá vesturstrondini á Suðuramerika til havleiðirnar millum Australia og Ný Sæland og sunnanfyri Australia.

Semja er ikki um, hvussu økið skal ásetast, men í sambandi við bráfeingis tiltøkini, sum semja var um á fundinum varð gjørt av, at økið er altjóða sjógvur sunnan fyri ekvator, norðanfyri CCAMLR-sáttmálaøkið, eystan fyri SIOFA-sáttmálaøkið og vestanfyri løgdømi hjá suðuramerikansku londunum.

Undan fundinum var uppskot til konvensjónstekst viðgjørt. Uppskotið hevur ásetingar, sum vanliga vera roknaðar at hoyra einum framkomnum økisfelagsskapi fyri fiskiveiðu til, og snúgva seg m.a. um institusjónellan bygnað (kommisjón, vísinda- og aðrar fastar nevndir), fiskiveiðistýring, eftirlit, skyldur hjá limalondum, skyldur hjá flaggstati, skyldur hjá havnum, avgerðartilgongdir, loysn av trætum o.t.

Orðaskiftið um avtalutekstin vísti, at á summum økjum hava londini grundleggjandi ymisk sjónarmið m.a. um avgerðartilgongdir (konsensus, kvalifiseraður meiriluti, møguleikin at mótmæla samtyktum o.t,), skipan av føstum undirnevndum og geografiska virkisøki hjá sáttmálanum. Harafturat hildu summi lond - við Australia á odda - at sáttmálin skal fevna um “alt” (vistskipan osfr.). Hinumegin hildu onnur, at uppskotið til sáttmálatekst í alt ov stóran mun fer í smálutir, og at nógv viðurskifti ístaðin eiga at regulerast aðrastaðni enn í sjálvum sáttmálanum.

Felagsskapurin er ikki formliga settur á stovn enn. Londini royndu tó á seinasta fundinum í Australia í november 2006 at semjast um fyribils tiltøk fyri regulering av fiskiskapinum (Interim measures). Á 3. fundinum í Kili í 2007 eydnaðist tað

londunum at koma ásamt um eina skipan, sum í høvuðsheitum er í tveimum: Pelagiskur fiskiskapur og botnfiskiskapur.

Tað, sum hevði størsta áhuga hjá Føroyum á hesum fundinum, var regulering av fiskiskapinum eftir pelagiskum fiskasløgum (rossamakreli – jack mackerel) í altjóða sjógvi útfyri Chile. Skip undir føroyskum flaggi eru sum kunnugt farin at royna eftir rossamakreli á leiðini.

Londini bundu seg til at avmarka royndina (effort) eftir uppsjóvarfiski, so hon í 2008 og 2009 ikki fer upp um tað, hon var í 2007. Mát fyri effort er brutto-tonnasja, BT (á enskum: Gross Tonnage, GT).

Londini skulu boða fyribils skrivstovuni í New Zealandi frá, hvussu nógv royndin var í 2007 og skjalprógva við VMS-data ella øðrum tilfari, hvørji skip fiskaðu har í 2007. Somuleiðis skulu strandalondini har suðuri upplýsa, hvørjar reguleringar tey hava sett í verk í sínum øki.

Semjan leggur eisini upp til vísindaligt samstarv og at savna allar stovnsmetingar og vísindaligar kanningar, so hesar kunnu verða grundarlag undir stovnsmetingum av pelagiskum stovnum. Rossamakrelur skal viðgerast í einum arbeiðsbólki av fiskifrøðingum, samstundis sum ein serlig workshop verður um rossamakrel.

Harafturat sigur semjan um pelagiska fiskiskapin, at londini í mest møguliga mun skulu hava eygleiðarar umborð á fiskiførum.

Fyri Føroyar merkir semjan, at vit ikki kunnu økja um royndina eftir rossamakreli (í brutto tonnasju) í 2008 og 2009 meira, enn hon var í 2007. Tvs. at skip undir føroyskum flaggi, sum hava fiskað í økinum í 2007, kunnu fiska undir somu treytum í 2008 og 2009.

Semja er um, at avmarka royndina og veiðina í botnfiskiskapinum (deep sea) til tað, hon er. Tað vil siga, at royndin og veiðan ikki skal fara upp um tað, hon var í miðal um árið í tíðarskeiðinum 1. januar 2002 til 31. desember 2006.

Harumframt er ásett, at lond ikki skulu víðka fiskiskapin eftir botnfiski til nýggjar leiðir í økinum, har slíkur fiskiskapur ikki er í løtuni.

Eftir semjuni skulu lond samstarva fyri at útvega veiðutøl, vísindarligar upplýsingar um viðbreknar vistskipanir í sjónum.

Semjan um botnfiskiskapin ávirkar ikki føroysk skip, tí tey hava ikki roynt eftir botnfiski í økinum. Hesi tiltøkini vera galdandi til ein endaligur sáttmáli er gjørdur, og møguliga onnur tiltøk verða samtykt sambært honum í framtíðini.

Fundurin tók undir við einum uppskoti hjá einum arbeiðsbólki um at seta í verk eina skipan fyri innsavning av data og upplýsingar um fiskiskapin í økinum. Semjan ber í sær, at londini seta í verk skipanir fyri innsavning av veiðitølum fyri fiskiskapin í økinum, eina loyvisskipan fyri fiskifør, skráseting av upplýsingum um fiskifør o.t. Í tí sambandi er ein standard fráboðanarmannagongd gjørd fyri trolveiðu, nótaveiðu og línuveiðu.

Ein forðing fyri verandi fiskiskapinum har er, at førosyk skip ikki sleppa inn í kilenskar havnir .Luttøka Føroya í nýggja samstarvinum fer helst eisini at hava týdning í hesum sambandi, tí kilenska stjórnin setur sum treyt at koma í havn í Kili, at viðkomandi flagglondini viðvirka til umsiting av tilfeinginum á økinum. Ætlanin er at taka formligt sambandi upp beinleiðis við Kili um havnaratgongd, nú at óformlig sambond eru fingin í lag við avvarðandi myndugleikar í Kili undir SPRMFO fundinum í apríl 2007.

Føroyar (tvs The Kingdom of Denmark in respect of the Faroe Islands) lúka treytirnar fyri at vera sáttmálapartur, tí Føroyar hava verið við til samráðingar.

Higartil hevur Grønland ikki víst áhuga fyri at vera við í hesum samráðingum. Tey londini, sum kunnu vera við at undirskriva avtaluna eru tey, sum hava verið við á fundinum, ella sum eru strandarlond við felagsskapin. Sambært seinast uppskoti til sáttmálatekst, kunnu onnur lond koma afturat aftaná 12 mánaðar eftir at innihaldið í sáttmálanum er samtykt og undirskrivað.

### *10.1.4 SIOFA*

Eitt annað sáttmálaøki, sum liggur upp at SEAFO og CCAMLR, er SIOFA. Hesin sáttmáli er ikki formliga komin í gildi enn. Samráðingarnar um sáttmálan endaðu í fjørsummar, og sáttmálin liggur frammi til undirskrivingar fram til 6. juli 2007 fyri lond, sum tóku lut í samráðingunum og strandalondum í økinum. Eftir hetta er sáttmálin opin fyri øllum, sum eru áhugað í fiskiskapi í økinum.

Londini, sum hava tikið lut í samráðingunum eru Australia, Comoros, EF, Frakland, Japan, Kenya, Madagaskar, Mozambique, Namibia, New Zealand, Russland, Seychellurnar og Yemen. Cook Islands hevur verið við sum eygleiðari.

Endamálið við SIOFA sáttmálanum er at tryggja langtíðar varveiting og burðardygga gagnnýtslu av fiskasløgum (øðrum enn tunfiski) á leiðum uttanfyri løgdømi strandalanda.

Enn er felagsskapurin, sum sáttmálin stovnar, ikki farin til verka, og ongar reguleringar eru settar í verk. Nevnast kann tó, at *Southern Indian Ocean Deepwater Fisheries Association,* hvørs limir hava fiskað í økinum síðani 1996, hava sjálvbodnir tikið stig til at friða 11 leiðir í altjóða sjógvi, svarandi til 309.000 $km^2$. Endamálið er at verja korallir og onnur botndjór.

## 11. Fylgiskjal 4. Talvur við veiðurættindum

Talva 3. Føroyar - Russland

| Føroysk rættindi í russiskum sjógvi: | 2003 Kvota | Brúkt | 2004 Kvota | Brúkt | 2005 Kvota | Brúkt | 2006 Kvota | Brúkt | 2007 Kvota |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur (cod) | 9.500 | 9.497 | 13.055 | 13.128 | 11.000 | 10.756 | 11.000 | 11.079 | 11.000 |
| Hýsa (haddock) | 1.180 | 1.174 | 1.720 | 1.645 | 1.340 | 1.295 | 1.340 | 1.361 | 1.340 |
| Flatfiskur (flatfish) | | | | | 1.000 | 366 | 1.000 | 568 | 900 |
| Lodna (capelin) | 7.000 | 4.760 | | | | | | | |
| Rækjur (shrimp) | | | 500 | 0 | 500 | 67 | 500 | 0 | 1.000 |
| **Russisk rættindi í føroyskum sjógvi:** | | | | | | | | | |
| Svartkjaftur (blue whiting) | 125.000 | 119.764 | 203.300 | 136.723 | 160.000 | 144.656 | 160.000 | 125.052 | 140.000 |
| Makrelur (mackerel) | 9.500 | 9.144 | 8.600 | 9.270 | 7.000 | 7.074 | 7.000 | 7.181 | 8.200 |
| Experimental fishery (500-700 m) | 200 | | 200 | | 200 | | 200 | | 200 |
| Makrelur (experimental fish.) | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

Kelda: Fiskiveiðueftirlitið

Talva 4. Føroyar - Ísland

| Føroyar í íslendskum sjógvi | 2003 Kvota | Brúkt | 2004 Kvota | Brúkt | 2005 Kvota | Brúkt | 2006 Kvota | Brúkt | 2007 Kvota |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Demersal species | 5.600 | 3.974 | 5.600 | 5.100 | 5.600 | 5.123 | 5.600 | 5.524 | 5.600 |
| of these max. | | | | | | | | | |
| Cod | 1.200 | 1.148 | 1.200 | 1.232 | 1.200 | 1.190 | 1.200 | 1.201 | 1.200 |
| Halibut | 80 | 40 | 80 | 86 | 80 | 91 | 80 | 96 | 80 |
| Capelin | 30.000 | 31.190 | 30.000 | 30.170 | 30.000 | 18.620 | 30.000 | 29.560 | 30.000 |
| Ísland í føroyskum sjógvi | | | | | | | | | |
| | **2003 Kvota** | **Brúkt** | **2004 Kvota** | **Brúkt** | **2005 Kvota** | **Brúkt** | **2006 Kvota** | **Brúkt** | **2007 Kvota** |
| Mackerel | 1.300 | 0 | 1.300 | 0 | 1.300 | 50 | 1.300 | 1.424 | 1.300 |
| Herring * | 2.000 | 1.240 | 2.000 | 0 | 2.000 | 0 | 2.000 | 0 | 2.000 |

Kelda: Fiskiveiðueftirlitið

Talva 5. Føroyar - Norra

| **Føroyar á norskum øki** | **2003** | | **2004** | | **2005** | | **2006** | | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Norðanfyri 62°N** | Kvota | Brúkt | Kvota | Brúkt | Kvota | Brúkt | Kvota | Brúkt | Kvota |
| Toskur (cod) | 1.700 | 1.700 | 2.175 | 2.175 | 2.108 | 2.108 | 2.108 | 2.108 | 1.800 |
| Hýsa (haddock) | 400 | 400 | 770 | 770 | 693 | 675 | 963 | 888 | 1217 |
| Upsi (saithe) | 450 | 450 | 632 | 632 | 892 | 892 | 1070 | 1070 | 1010 |
| Kongaf, upsi, svartk. & annað | 50 | 20 | 50 | 50 | 50 | 50 | 100 | 100 | 100 |
| **Svalbard** | | | | | | | | | |
| Toskur (cod) | 818 | 828 | 1.007 | 983 | 975 | 980 | 946 | 948 | 849 |
| Annað (other) | 197 | 58,6 | 242 | 237 | 235 | 189 | 228 | 58 | 205 |
| **Yvirført úr russiskum øki** | | | | | | | | | |
| Toskur (cod) | 2.600 | 2.606 | 3.000 | 3.008 | 2.600 | 2.430 | 2.780 | 2.772 | 2.780 |
| Hýsa (haddock) | 200 | 129 | 100 | 101 | 100 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kongaf, upsi, svartk. & annað | 280 | 93 | 300 | 98 | 300 | 291 | 200 | 86 | 200 |
| Lodna (capelin) | 5.000 | 4.760 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | | | | | | | | |
| Lodna (capelin) | 4.000 | 4.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Makrelur (mackerel)* | 1.475 | 11.177 | 1.357 | 10.950 | 1.045 | 8.596 | 1.100 | 11.897 | 1.243 |
| Svartkjaftur (royndarveiða) | 500 | 0 | 500 | 0 | 500 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Jan Mayen** | | | | | | | | | |
| Svartkjaftur (blue whiting) | 100 | 0 | 100 | 0 | 100 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Rækjur (royndarveiða) | 50 | 0 | 50 | 0 | 50 | 0 | 50 | 0 | 0 |
| **Sunnanfyri 62°N** | | | | | | | | | |
| Ídnaðarfiskur | *19.780* | *8.323* | *19.780* | *7.512* | *17.580* | *3.678* | *2.780* | | *2.480* |
| Hvítingsbróður (norway pout) | 8.000 | 2.379 | 8.000 | 1.042 | 0 | 9 | | | |
| Svartkjaftur (blue whiting) | 8.000 | 5.416 | 8.000 | 6.332 | 16.800 | 3.582 | 2.000 | 365 | 1.700 |
| Nebbasild (sandeel) | 3.000 | 432 | 3.000 | 50 | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| Brislingur (sprat) | 500 | 20 | 500 | 0 | 500 | 0 | 500 | 0 | 500 |
| annað (other) | 280 | 76 | 280 | 88 | 280 | 87 | 280 | 7 | 280 |
| Upsi (saithe) | 1.400 | 471 | 1.100 | 566 | 1.415 | 1.220 | 600 | 47 | 600 |
| Sild (herring) | 700 | 747 | 700 | 364 | 700 | 740 | 1.000 | 1.250 | 750 |
| Rossamakrelur ** | 1.000 | 59 | 1.000 | 97 | 1.000 | 35 | 1.000 | 0 | 3.000 |
| Hávur/hemari ** | 300 | 0 | 300 | 0 | 300 | 0 | 300 | 0 | 30 |
| * also in the area between 57°30'N and 62°N | | | | | | | | | |
| ** also north of 62°N | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | |
| **Noreg á føroyskum øki** | | | | | | | | | |
| Botnfiskur (demersal species) | *5.222* | *5.272* | *5.470* | *5.393* | *5.310* | *4.636* | *5.267* | *2.375* | *5.156* |
| Longa/blálonga (ling/blue ling) | 2.200 | 2.362 | 2.200 | 2.330 | 2.200 | 2.186 | 2.457 | 1.125 | 2.406 |
| Brosma (tusk) | 1.800 | 1.919 | 1.800 | 2.084 | 1.800 | 1.781 | 1.800 | 1.052 | 1.759 |
| Upsi (saithe) | 400 | 56 | 400 | 93 | 400 | 87 | 100 | 35 | 100 |
| annað (other) | 822 | 935 | 1.070 | 886 | 910 | 582 | 910 | 163 | 891 |
| Makrelur (mackerel) | 6.100 | 0 | 5.612 | 0 | 4.321 | 0 | 1.577 | 0 | 1.782 |
| Svartkjaftur (blue whiting) | 36.200 | 28.625 | 36.200 | 35.265 | 36.200 | 34.025 | 20.800 | 5.842 | 19.150 |
| Brugdulivur (basking shark liver) | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Rossamakrelur (horse mackerel) | 230 | 0 | 230 | 0 | 230 | 0 | 230 | 0 | 230 |
| Hávur/hemari | 300 | 0 | 300 | 0 | 300 | 0 | 300 | 0 | 30 |
| Royndarveiða | 100 | 0 | 100 | 0 | 100 | 0 | 0 | 0 | 0 |

Kelda: Fiskiveiðueftirlitið

Talva 6. Føroyar – ES

| **ES í føroyskum sjógvi** | **2003** | | **2004** | | **2005** | | **2006** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Quotas | Catch | Quotas | Catch | Quotas | Catch | Quotas | Catch |
| Cod / haddock | 500 | 467 | 500 | 453 | 500 | 457 | 500 | 394 |
| Saithe | 2.500 | 1.343 | 2.500 | 1.218 | 2.500 | 277 | 2.500 | 1.252 |
| Redfish | 6.300 | 237 | 6.300 | 298 | 4.000 | 25 | 4.000 | 181 |
| Blue ling / ling | 3.240 | 2.242 | 3.240 | 2.420 | 3.240 | 2.048 | 3.240 | 1.787 |
| Flatfish | 1.000 | 225 | 1.000 | 132 | 600 | 93 | 600 | 103 |
| Mackerel | 3.893 | 0 | 3.589 | 0 | 2.763 | 0 | 2.763 | 0 |
| Blue whiting | 16.000 | 15.889 | 16.000 | 10.895 | 16.000 | 16.338 | 16.000 | 12.675 |
| Other white fish | 760 | 586 | 760 | 591 | 760 | 647 | 760 | 624 |
| RNG/BSF | | | | | 1.080 | 1.051 | 1.080 | 855 |

| **Føroyar í ES sjógvi** | **2003** | | **2004** | | **2005** | | **2006** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Quotas | Catch | Quotas | Catch | Quotas | Catch | Quotas | Catch |
| Mackerel | | | | | | | | |
| VIa(N), VIIe,l,h; IV | 8.572 | 2.837 | 7.903 | 1.130 | 6.085 | 793 | 6.085 | 170 |
| Horse mackerel | | | | | | | | |
| IV, VI(a)N,VIIe,l,h | 7.000 | 750 | 7.000 | 20 | 6.500 | 3.660 | 6.500 | 1.267 |
| Herring | | | | | | | | |
| VIa(N) | 660 | 745 | 660 | 80 | 660 | 1310 | 660 | 610 |
| IIIa(N) Skagerrak | 500 | 193 | 500 | 29 | 500 | 440 | 500 | 447 |
| Prawns | | | | | | | | |
| NAFO 1 | | | | | | | | |
| ICES XIV / V | 1.150 | 1.088 | 1.150 | 1.058 | 1.150 | 819 | 1.150 | 563,1 |
| Greenland halibut | | | | | | | | |
| NAFO 1 | 150 | 146 | 150 | 150 | 150 | 149,7 | 150 | 150 |
| XIV / V | 150 | 150 | 150 | 144 | 75 | 62,7 | 75 | 63 |
| Redfish XIV / V | 500 | 515 | 500 | 243 | 500 | 34,3 | 500 | 0 |
| Ling, Tusk, Blue ling VIa 2) | 800 | | 800 | 0 | 800 | 47,2 | 800 | 9,5 |
| Blue ling 3) | 940 | 2 | 940 | 5 | 900 | 2,2 | 900 | 0 |
| Norway pout IV; VIa(N) | | | | | | | | |
| Sandeel IV Sprat IV; VIa(N) | 20.000 | 5.190 | 20.000 | 3.698 | 6.000 | 2046 | 6.000 | 200 |
| Blue whiting VIa(N); VIb; VII | 45.000 | 47.091 | 45.000 | 48.385 | 45.000 | 44.870 | 45.000 | 48.551 |
| Capelin XIV / V | 10.000 | 5.225 | 10.000 | 1.850 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Porbeagle Entire Community zone | | | | | | | | |
| except for NAFO 3Ps | 125 | 0 | 125 | 0 | 125 | 0 | 125 | 0 |
| Other white fish IV; VIa(N) | 400 | 3 | 400 | 6 | 400 | 20,1 | 400 | 6,5 |

Kelda: Fiskiveiðueftirlitið

Útgivið hevur: Fiskimálaráðið
Heykavegur 6,
P.O. Box 347
FO-110 Tórshavn

FISKIMÁLARÁÐIÐ